# Herrópið

Ein serútgáva av
Krigsropet
KR 40,–

MENTAN • TRÚGV • SAMFELAG



## Frelsunarherurin:
# Ein 100 ára gamal, sum ikki slítist

**Finngerð Djurhuus Olsen:** Trygdarnet í storminum

**Martin Kúrberg:** Rúsumsorgan persónlig



Mynd: Mette Randem

# Frelsunarherurin í Føroyum fyllir 100 ár

**Hvat:** Frelsunarherurin hevur í dag tvey korps í Føroyum, eitt er í Havn og eitt er í Vági. Tvær vælgerðarskipanir eru innan Frelsunarherin, sum veita hjálp til tey, sum hava rúsevnatrupulleikar: Frælsi fyri tey ungu, og eina skipan har gáttin er lág, Herbergið við hitastovu o.ø.

**Hvussu:** Hátíðarhaldið verður hildið frá 23. til 30. okt. 2024 við ymiskum møtum og sjálvandi hoyrist glaður marsjur á vegunum.
*Visti tú, at hetta er fyrstu ferð, at Krigsropet kemur út sum eitt serstakt blað á føroyskum?*



# Innihaldsyvirlit

Herrópið nr. 1, 2024


Sigmundur Andreasen: **Skipari í stormi** 4

Heilsan: **Astrid Hansen, økisleiðari** 9





Mynd: Mette Randem




Mynd: Marit Dehli-Johannesen


Henrietta og Sámal Midjord: **Út í ókent farvatn** 10

Elisabeth Joensen: **Krigsropet skapar samband** 16

6 ung í Havn: **Mótvektin** 18

Dánjal og Heidi: **Ein ferð** 22

Martin Kúrberg: **Rúsumsorgan persónlig** 28

Finngerð Djurhuus Olsen: **Trygdarnet í storminum** 34

Frelsunarherurin: **Ein 100 ára gamal, sum ikki slítist** 40

Nýggj sangbók: **Føroyar syngja!** 46

Minningarorð: **Njál Mackay Djurhuus** 50





Mynd: Marit Dehli-Johannesen







# Skipari í stormi

Sigmundur Andreasen er førur fyri at standa ímóti herfólki og varð settur í varðhald.
– Eg havi ongantíð verið bangin, sigur skiparin og soldáturin í Frelsunarherinum í Vági.
Føroyingurin veit, hvør er hjá honum.

**Tekstur og mynd:** Marit Dehli-Johannesen

– Áðrenn eg fari til songar, skrivi eg ofta ein sang, sigur Sigmund Andreasen. Íalt er tað blivið til 300 sangir, og fleiri av teimum hevur hann eisini gjørt lag til. Tvær fløgur hevur hann givið út, har dóttirin og versonurin eisini syngja við.

– Nei, eg var ikki bangin, endurtekur hann.

– Eg var bara illur inn á fronsku skipanina.

73 ára gamli Sigmundur hellir seg fram á stólin. Maðurin, sum vanliga er smílandi og spælir gittara á møtunum í Frelsunarherinum, verður eitt sindur álvarsamur. Munurin millum tær ræðuligu hendingarnar, sum hann upplivdi í Suðuríshavinum, kundi ikki verið størri. Í hølunum hjá Frelsunarherinum í Vági er fjálgt og stilt, tó at tað er nógvur vindur uttanfyri. Á vegginum hongur ein málningur, sum Sigmundur hevur málað. Málningurin er um, tá eingilin uggar Jesus í Getsemane. Sigmundur hevur sjálvur kent nærveruna, tá tað hevur sansað at. Hann hevur sjálvur upplivað tap og verið í stórum vanda. Hesin garvaði sjómaðurin hevur mist beiggja sín á sjónum, hann hevur verið í øki, har kríggj er, og tað hevur verið skotið eftir honum í friðarligum farvatni.

Fyri 25 árum síðan var ikki bert sjóvarilska. Tað suðurafrikanska skipið, sum hann stýrdi, varð tikið uttan fyri tær fronsku Kerguelin-oyggjarnar. Á brúnni stóð skiparin og sá tyrlur sveima uppi yvir fiskiskipinum og sá, at eitt størri herskip kom nærri teimum. Skjótt komu 12 vápnaðir franskir hermenn umborð og góvu boð um, at manningin, sum vóru 24 í tali, skuldu fara fram á skipið. Har stóðu teir í ískalda vindinum og við maskinbyrsum rættum ímóti sær.

Sigmundur bleiv ákærdur at hava ránfiska tannfisk í einum øki, sum Frakland hevði ræðisrætt yvir. Men skiparin vildi ikki finna seg í at verða viðfarin soleiðis. Teir høvdu fiskað uttan fyri Avstralia, og skipið var á veg heim aftur til Mauritius.

– Fraklendingarnir kravdu, at eg skuldi gjalda 40 milliónir franskar frankar fyri tey 85 tonsini av tannfiski, ið vit høvdu í lastini. Eg hevði bestan hugin at kasta alt fyri borð. Her mátti tá vera rættvísi, so eg noktaði at góðtaka kravið.

Sigmundur heldur, at fraklendingarnir høvdu ætlanir, sum teir vildu fjala. Í árunum frá 1966 og til 1996 hevði Frakland havt fleiri atom-royndarspreingingar á oynni Mururoa í fronskum Polynesia í Kyrrahavinum. Økið varð nógv eitrað, og Frakland var fyri stórum atfinningum. Umhvørvisverndarfólk sendu skip at steðga spreingingunum. Hetta gjørdi, at stríðið varð so hart, at fraklendingar søktu eitt av skipunum og ein maður doyði. Hetta hevði við sær, at kanningarnar hildu uppat, í hvussu so er á pappírinum. Men Sigmundur er av einari aðrari fatan.






– Gud hevur altíð verið við mær, hvar eg enn havi verið. Eg havi ongantíð óttast, heldur ikki á sjónum, sigur Sigmund Andreasen. (Ovara myndin: Marit Dehli-Johannesen. Niðara myndin: Mette Randem).

– Eg eri sannførdur um, at teir fluttu alla útgerðina til Kerguelin-oyggjarnar, sum eru um 2000 sjómíl burtur frá fólki, og royndu at fjala tað, sum teir høvdust at á oyggjunum. Eg kann onki prógva, men eg veit, hvat eg sá og upplivdi, sigur hann.

Um hesa tíðina høvdu fraklendingar viðtikið nýggjar reglur, sum søgdu, at tú ikki hevði loyvi at fara nærri enn 200 sjómíl frá Kerguelin-oyggjunum. Sigmundur sigldi tí langt sunnan fyri oyggjarnar og fiskaði í einum øki, har ongin hevði fiskað áður.

Men á veg heimaftur kom hann ov nær í eini roynd at spara brennievni. Hann trúði, at alt var í lagi, tá teir bert skuldu sigla ígjøgnum økið. Men so varð ikki. Tann franska hermegin fór til verka og tók skipið og førdi skipið inn til oynna Reunion, sum er eitt fyrrverandi franskt hjáland í Indiska havinum uttanfyri Madagaskar. Har blivu teir verandi. Fleiri skip blivu søkt. So varð eisini við Explorer, eitt skip, sum Sigmundur hevði ábyrgdina av.

**Fangi í níggju mánaðir**

Nógv varð skrivað í bløðunum og sagt í útvarpinum í Føroyum og í Fraklandi um skipini, sum vórðu tikin av fraklendingum. Sigmundur bleiv tikin og settur inn í ein fongsulskliva uttan leyst innbúgv, har sat hann í tveir dagar uttan mat. Og tó so føldi hann seg tryggan.

– Eftir at hava dripið allar mýggjabitararnar, legði eg meg á briksina, bað eina bøn og svav væl, sigur hann.

– So var eg tikin inn til forhoyr í 48 tímar.

– Í fleiri tímar varð eg hóttur, men teir komu ongan veg við mær.

Kanska var tað sinnalagið, sum bjargaði honum frá hesi vánaligu viðferðini? Tí Sigmundur stóð fastur í tí, sum hann hevði sagt. At enda slapp hann út og varð fluttur á eitt gistingarhús. Og tó so var hann ikki frælsur maður.

– Eg var fangi á oynni í nýggju mánaðir. Alla tíðina var eg í øðini. So hvønn dag rann eg eina míl (í Noregi og Svøríki er ein míl 10 km). Eg noktaði øllum, sigur hann.

Skiparin stríddist at fáa manningina leysa. Tað eydnaðist. Men frá 2. mars til 25. septembur var hann hildin fastur á Reunion. Boðini vóru greið: Royndi hann at flýggja, so kundi hann rokna við at sita í tvey ár í fangahúsi. Sigmundur kendi, at hann hevði eina uppgávu at loysa í hesi støðuni. Har vóru aðrir sjómenn, sum vórðu hildnir aftur. Teir stríddust við angist. Og Sigmundur royndi at hjálpa teimum.

– Tveir menn úr Spaniu vóru fangar saman við mær á gistingarhúsinum. Teir vóru bangnir. Tann eini hevði ongar tenn, tá skipið, teir vóru við, varð tikið. Tá fór eg við bussinum oman til skipið. Og eg fann tenninar uppi á brúnni. So tá fekk hann tær aftur, sigur Sigmundur.

**– Eg havi fingið lívið sum gávu. Eg gleðist yvir at síggja, at onnur hava tað gott.**

**Sigmund Andreasen,**
*skipari og frelsissoldátur*

Heima í Suðuroynni sat konan Annedukk saman við tveimum børnum og tey vistu onki. Tey vóru von við, at Sigmundur var burtur í bæði fýra og sjey mánaðir. Men hesa ferð óttaðust tey, at hann ikki kom aftur. Útvarpið royndi at fylgja málinum, men lítið var at frætta. Mánaðir gingu.

– *Hvussu vart tú førur fyri ikki at stúra?*

– Eg var ongantíð bangin. Eg hevði Gud við mær og eg bað fyri teimum har heima.

Sum tíðin leið, so kendi hann, at hann trongdi til at vera saman við øðrum kristnum. Og hann byrjaði at leita eftir eini meinigheit.

**Lumpaði øll**

Ein dagin, hann var ein gongutúr í høvuðsstaðnum Saint Denis, sá hann ein kross á einum bygningi. Dagin eftir fór hann á møti í eini hvítusunnusamkomu.

– Har var nógv bøn og tungutala. Eg bað á føroyskum, og tað var mín tungutala, flennur hann. Hann er ikki so upptikin av, at kirkjur og samkomur eru ymiskar.

Sum 14-ára gamal fór hann til skips, og hevur hann vitjað kirkjur í øllum heimsportum. Nú var tað gott at hava eina meinigheit at fara til. Heima í Vági bóðu tey fyri honum í Frelsunarherinum. Kanska hetta gav honum eyka styrki? Sigmundur og ein spanskur vinmaður tóku dystin upp. Advokatarnir fingu gongd í rættarviðgerðina og at enda vunnu teir. Í teirri fyrstu rættarviðgerðini, sum varð leidd av tí franska hervaldinum, fekk skiparin ikki loyvi at tosa. Í næstu rættarviðgerðini stóð Sigmundur framman fyri dómaranum og gav hon eini greið boð:

– Tað er ikki ein fiskur í teimum 85 tonsunum, sum tit tóku frá mær, sum var undir fimm kilo. Teir fiskarnir sum fronsku trolararnir lata til marknaðin her, eru smærri fiskar. Tað eru teir sum útrudda stovnin, ikki eg.

Tað gekk ikki long tíð til tíðindastovnarnir í París fóru at viðgera málið. Og hann varð ringdur upp av fronskum reiðaravirkjum. Úrslitið varð, at bert eitt reiðaravirki fekk loyvi at fiska í hesum økinum. Og skjótt eftir hetta varð Sigmundur latin leysur. Sigmundur gjørdi skjótt av og fór heim til Føroyar uttan at tíðindastovnar og familja vistu av. Hann rakk júst at koma til 18-ára føðingardagin hjá dóttrini.

Hann smílist: – Tað var gott at koma heim!

**Tónaskald og sangskrivari**

Hann veit, at lívið á sjónum er ein avbjóðing fyri familjuna. Men soleiðis eru umstøðurnar hjá fleiri í Føroyum.

– Nógv børn eru von at hava ein pápa, sum er sjómaður. Eg saknaði altíð familjuna, men eg hevði ikki tíð at hugsa. Ikki var nógv tíð at hvíla í og ikki var møguleiki at ringja heim ella at senda eini boð.

– Tá var tað gott at kunna biðja.

– Eg havi altíð verið trúgvandi, sigur skiparin, sum hevur siglt flestu høvini.

Í Klaksvík, har hann er uppvaksin, var familjan í kirkjuni og í Heimamissiónini. Men hjá Sigmundi var ikki nógv tíð brúkt í meinigheitslívinum. Men úti á havinum var hann bergtikin av vakurleikanum í skaparverkinum.

– Tað er so stórt, so ótrúligt! Á havinum sært tú fuglar, fiskar, hvalir og nógv annað. At hetta er Guds skaparverk, hugsi eg altíð um. Tað er so ótrúligt at uppliva stjørnuhimmalin og tá sólin rísur.

Nú er hann í Vági. Endiliga er landfast undir fótunum. Tað kennist.

– Sigmundur er ein sera góður stuðul hjá okkum í meinigheitini, sigur Henrietta Midjord, sum er leiðari í Frelsunarherinum í Vági.

Í gongini hongur ein málningur hjá Sigmundi, ein krossur sum vísir vegin til frelsu. Í sangbókini er ein sangur, sum hann hevur yrkt. Hann hevur yrkt fleiri sangir. Sigmundur hevur givið út 2 fløgur og hevur yrkt einar 300 sangir. Teir flestu eru um Jesus, men hann hevur eisini yrkt nakrar sjómansvísur. Manskórið „Orðið á borðið" syngur eisini onkran av sangunum hjá honum.

– Sigmundur er eisini tøkur í samband við sunnudagsskúlan. Hann talar, vitnar og er góður at tosa við, sigur Henrietta.

**Nær deyðanum og lívinum**

Hon undrast, hvussu villigur hann er. Sigmundur tosar ikki nógv um tað, sum honum hevur verið fyri, men hann hevur verið illa sjúkur.

– Fleiri ferðir havi eg verið deyðanum nær, men eg eri ikki bangin at doyggja.

Seinasta ár hekk lívið í einum tunnum tráði. Í fleiri dagar var pulsurin um 30, tá var hann sendur á sjúkrahús, fyrst til Havnar og síðan til Keypmannahavnar. Læknin var bilsin, at hann var so væl fyri fysiskt. Teir longu túrarnir við hundinum høvdu óiva bjargað honum. Sigmundur hevur eisini havt blóðpropp og krabba í nýrunum.

– Eg havi fingið lívið sum gávu. Eg gleðist yvir, at onnur hava tað gott. Vit skulu hjálpa øllum at finna vegin til himmalin.

Hví bleiv Frelsunarherurin hansara meinigheit?

– Í mínum eygum var Frelsunarherurin bert eitt hjálparfelag. Men tá vit fluttu til Vágs í 1971, dámdi mær væl at koma har.

– Har møtti eg einum flokki av ungum norðmonnum. Teir vóru fullir av lívi, spældu gittar, klaver og slógu á trambolinir.

– Hetta var heilt ótrúligt. Og eg hugsaði: Her eigi eg at vera!

– Nú eru um 47 ár síðan eg og konan blivu soldátar í Frelsunarherinum. Men Sigmundur kennir, at hann hevur meira at geva.

– Vit liva so stutt. Eg spyrji meg sjálvan: Hvat nýtir tú tíðina til? Eg havi fiskað alla mína tíð, nú vil eg fiska menniskju. ■





# Heilsan

Breiðið krossins merki út!



**Astrid Hansen**

*Majorur, korps- og økisleiðari, Frelsunarherurin í Føroyum*

Frelsunarherurin í Føroyum heldur føðingardag: Vit verða 100 ár. Og vit skulu fagna minninum um eina tíð, sum er farin og um tey, sum eru farin undan okkum. Og so skulu vit, sum nú eru: Frelsunarherurin í dag, vit fara inn í okkara samtíð.

Frelsunarherurin ynskir at vera ein „slóðari" í samfelagnum: Sum boðar um, at Guds náði er til øll menniskju, og sum peikar á skeivleikar og órættvísi í samfelagnum. Og vit ynskja altíð at tosa søk teirra veiku. Tí at Guds náði er til øll.

William Booth, hann ið byrjaði Frelsunarherin, hann byrjaði í 1865 East London Christian Mission. Og hann hugsaði, at hetta verður tað. Men lítið visti hann, tí at hetta var bert byrjanin. Tí í dag arbeiðir Frelsunarherurin í 130 londum. Og í dag hevur hann eina av heimsins størstu hermegi. Hetta er ein friðar hermegi, sum ynskir at vísa á tað, sum er órættvíst í samfelagnum og at vera ein rødd hjá teimum, sum onga rødd hava. Og at fortelja øllum, at tey eru elskaði av Gudi. Og at øll menniskju eru fevnd av kærleika Guds.

Frelsunarherurin er vorðin ein partur í føroyska samfelagnum. Tey flestu vita um Frelsunarherin. Í Føroyum er ongin hernaðarmegi. Tí er tað bert í Frelsunarherinum at nýtt verða hernaðarlig orð.

Frelsunarherurin í Føroyum hevur eisini víst á ymiskar avbjóðingar í føroyska samfelagnum. Vit kunnu nevna avbjóðingarnar við teimum heimleysu. Avbjóðingarnar við rúsevnum. Hetta er nakað, sum korpsið í Havn fór í holt við fyri 25 árum síðani. Tey keyptu grannahúsini og broyttu tey til Herbergið. Hetta varð seinni víðkað, tá Frelsunarherurin keypti matstovuna „Kaggan" og bygdi hana um til Herbergið við hitastovu o.ø.

Á Eiði er eitt viðgerðarheim fyri ung við rúsevnatrupulleikum, so at tey kunnu fáa viðgerð í Føroyum.

Frelsunarherurin hevur tvey korps í Føroyum, eitt er í Havn og eitt er í Vági. Her eru øll hjartaliga vælkomin, um tú ynskir kristnan felagsskap ella ynskir at verða limur. Vit ynskja at vera ein góður og savnandi felagsskapur hjá øllum í Føroyum. Hesi bæði korpsini hava í dag eitt víðfevnandi arbeiði millum børn, ung, vaksin og eldri.

Frelsunarherurin í Føroyum veitir eisini neyðhjálp. Tey geva mat til tey, sum eru komin í ymiskar truplar umstøður, og hjálpa teimum, sum treingja til bráðfeingis hjálp.

Vit ynskja at vera „eitt pluss" í føroyska samfelagnum. Og at vera sjónliga til staðar hjá øllum.

Við: Suppu, sápu og frelsu.

Til øll í Føroyum

*astrid.hansen@frelsesarmeen.no*

# Út í ókent farvatn

Henrietta og Sámal Midjord livdu eitt familjulív, har alt var lagt til rættis. Skemt broytti alt. >>

**Tekstur og mynd:** Marit Dehli-Johannesen












Suðuroyggin er sunnasta oyggj í Føroyum. Hon er 32 kilometrar long við djúpum firðum og brøttum fjøllum. (Myndir: Mette Randem)

Hølini hjá Frelsunarherinum liggja væl fyri við høvuðsvegin. Vágsbygd er ein vøkur og veðurbard bygd. (Myndir: Mette Randem)

– Henrietta, eg havi onki gjørt í dag, suffaði Sámal.

– Hví sigur tú tað?

– Eg havi bara tosað við fólk.

– Ja, men tað er júst tað, sum tú skalt gera!

Leiðararnir í Frelsunarherinum í sunnastu oynni í Føroyum ynskja at fáa samband við fólk. Hvønn týsmorgun savna tey um 40 menn til morgunmat, at práta, biðja og syngja. Fólk í Suðuroynni, og fleiri aðrastaðni í Føroyum, kenna til Orðið á borðið! Og fleiri leggjast afturat. Hvussu ber hetta til?

Vit fara ein túr til Suðuroyar við Smyrli. Smyril leggur at á Krambatanga og vit koyra við bili til Vágs. Og vit verða væl móttikin av Henriettu og Sámali uttanfyri Frelsunarherin í Vági.

– At skapa samband er týdningarmikið. At fáa samband, er ikki so fremmant fyri okkum.

Í sjey ár hava tey leitt arbeiðið í Frelsunarherinum. Higar komu tey ein dag í juli fyri sjey árum síðan saman við trimum smáum børnum.

**Tá skemt varð til álvara**

Hvussu ber tað til, at eini foreldur í Havn við trimum smábørnum enda í Suðuroynni?

– Tað byrjaði við skemti, flennur Henrietta.

Fyri sjey árum síðani var dagurin fyltur við arbeiði og smábørnum í Havn. Hon var lærari í einum barnagarði og hann arbeiddi á lagrinum hjá sjúkrahúsinum í Havn. Tey trivust væl í arbeiðinum og hildu, at tey arbeiddu á røttum stað. Ein dagin, Henrietta var á møti í Frelsunarherinum, fekk hon at vita, at offiserarnir í Vági skuldu flyta á annað stað. Tá hon kom heim aftur, skemtaði hon við mannin og segði:

– Ja, Sámal, tú ert biðin um at fara til Vágs, tí tey hava brúk fyri einum korpsleiðara.

– Hvat?

Men tá varð tankin sáddur í teimum. Eitt sindur seinni komu leiðararnir í Havn, Randi og Bjørn Ove Frøyseth, at vitja tey.



Mynd: Mette Randem

Suðuroyggin er sunnasta oyggin og har er m.a. Vágs bygd. Her, ímillum seyðir og hús, leiða Henrietta og Sámal Midjord Frelsunarherin.

– Tá høvdu vit tikið støðu, at vit onki skuldu siga um Vág – um tey onki nevndu. So sótu tey har og vit tosaðu um alt annað, greiðir Henrietta frá og suffaði léttan.

Beint áðrenn offiserarnir skuldu fara út um dyrnar, spyr Randi: – Men hvussu er við offisertænastuni?

– Tá máttu vit bara siga, at um Frelsunarherurin hevði brúk fyri teimum í Vági, vóru tey tøk.

Tey høvdu eisini familju har suðuri. Pápi Henriettu er føddur og uppvaksin í oynni. Og so er eisini við Sámali.

– Hetta var tó ikki so einfalt. Vit høvdu keypt eini hús og tikið lán. Men vit hugsaðu sum William Booth: „Hví ikki okkum?"

Síðan gekk alt skjótt. Fýra mánaðir seinni fór familjan við flytigóðsinum við Smyrli til Suðuroyar.

– *Hvussu var skiftið?*

– Gud hevur verið við. Vit komu undan, flennur Sámal. Henrietta lítur afturá tíðina:

– Tað er hugtakandi at hugsa um. Vit sótu uppi alla náttina, áðrenn vit skuldu fara. Børnini lógu og svóvu. Og vit søgdu hvør við annan: „Hvat hava vit gjørt?" Men vit blivu væl móttikin av leiðarunum, sum tá vóru, Idu Karin og Gunnari Eide.

Tey høvdu fyrireikað tey, at tey vildu blíva roynd um støðuna, tey høvdu tikið. Og ivin kom, men tey valdu at halda fast við støðuna, tey høvdu tikið. Síðan hava tey fingið fleiri staðfestingar, at støðan var røtt.

– Vit vórðu væl móttikin av fólki í Frelsunarherinum. Hetta var til ríka signing fyri okkum og børnini. Hetta var ótrúligt; børnini trívast væl og eru trygg. Og vit kenna, at vit gera eitt týdningarmikið arbeiði. Vit eru á einum stað, har vit kunnu geva nakað og at Gud kann brúka okkum. Vit eru farin frá tí anonyma lívinum í Havn, sigur Sámal.

– Nú hugsavna vit okkum um tey um 1340 fólkini, sum búgva í Vági. Í Vági er eitt fjølbroytt vinnulív.

– Sjálvi eru vit soleiðis, at vit ynskja, at alt er lagt væl til rættis, áðrenn vit gera nakað. Men hesa ferð hættaðu vit okkum at fara. Viðhvørt hava vit hugsað: „Nú gevast vit, vit orka ikki meira". Men tó so eru vit før fyri tí. Tað er so ótrúligt at vera tvey: Tá eg ikki eri før fyri meira, so ger hann tað. Og umvent. Men hetta hevur verið ein avbjóðing. Vit bæði høvdu ongantíð áður arbeitt saman, viðgongur Henrietta.

Ein dagin, tá alt ikki gekk eftir vild, møtti ein eldri kvinna Sámali og segði við hann: „Tit mugu ikki fara úr Vági. Tit eru til ríka signing fyri bygdina."

**Orðið á borðið**

Tað kann vera trupult at fáa mannfólk á møti. Men ikki í Vági. Hvønn týsmorgun er sum at hoyra bassrøddirnar, tá menninir sessast rundan um breyðfótini í Frelsunarherinum. Hesir menninir eru sosialir, teir elska at syngja og hava fingið sítt egna kór; Orðið á borðið-kórið.

– Fólk elska teir. Teir syngja av hjarta, tað er so ekta, sigur Henrietta.

Prátið við borðið er ein týðandi partur:

– Her práta vit saman hvør við annan og ikki um hvønn annan, sigur Sámal.

Hetta er ein góður siður í einum lítlum samfelag. Tað skal vera trygt at eta saman. Og tað er Orðið, Jesus, sum er miðdepilin. Í gjár vóru vit 39 mans. Og aftur hesa ferð var ein nýggjur maður við. Teir, sum koma, fáa vinmenn og starvsfelagar við sær. Í sjey ár er luttøkan tvífalt so stór. Hvat er tað, sum fær menn við ella uttan trúgv at koma viku eftir viku?

– Eg eri ræddur, at teir skulu verða keddir, so eg royni at finna nýggj evni, sigur Sámal.

Hann hevur lært nakað um, hvat talar til ein raskan mann. Góðar søgur frá sjólívinum. Hann ger eitt kanningararbeiði, hoyrir hvat verður sagt frá um arbeiðið, sum hevur við sjógvin at gera. Hann vísir filmar, har eldri menn siga frá Guds nærveru, tá illveður er. Og savnaðurin lurtar. Har eru fiskarar, skiparar, politikarar og onnur. Og her eru øll í sama báti. Bond verða



Mynd: Mette Randem



– Tú kemur so tætt inn á fólk her í Vági, øll kenna teg. Tað er jaligt, heldur Sámal Midjord. (Mynd: Marit Dehli-Johannesen)

knýtt, og knappliga hava teir nakað at tosa um, tá teir hitta hvør annan í handlinum.

**Sosialhjálp í tí dulda**

Tað er nakað av vindi, so vit fara í bilin og koyra nakrar 100 metrar eftir høvuðsvegnum í Vági. Her er ein hugnalig kaffistova við góðum útsýni móti Vágsfirði. Tveir minuttir seinni er Sámal komin í prát við tveir av gestunum.

– Vita tit hvør hetta man vera, spyr ein eldri norðmaður og vísir teimum eina eldri svart-hvíta mynd av eini ungari gentu, sum trillar ein barnavogn.

– Eg varð føddur her fyri 72 árum síðani, og eg havi ikki verið her síðani. Kanst tú finna, hvør henda unga genta er, sum trillar vognin?

Sámal hyggur at myndini og lovar at kanna málið. Men samrøðan steðgar ikki har. Hann spyr, lurtar og er áhugaður. Tað er soleiðis, hann knýtir sambond. Annars fer hann hvørja viku til fótbóltsliðið í Vági, har børnini venja. Og hann elskar at fara til dystir hjá FC Suðuroy. Hann prátar við fólk allastaðni og gevur sær góða tíð.

– Tað er fantastiskt at vera í Frelsunarherinum har sambond eru so týðandi, sigur hann.

Her fáa hjúnini eisini lut í, at lívið ikki altíð er so lætt. Tey møta fólki, sum hava tað torført, og sum kanska treingja til eina song. Í eini bygd sum Vágur geva tey sosialhjálp í stillum. Tað eru fólk, sum hava fíggjarligar trupulleikar, tey fáa vøru koyrda til hús. Kommunan hevur spurt tey, um tey kunnu hýsa fólki, sum ikki hava nakað stað at búgva. Í Vági og í Havn hevur Frelsunarherurin eina hjálp, sum verður nevnd Jólahjálpin. Í Vági byrjaðu tey við Jólagrýtuni fyri um 6 árum síðani. Tá fekk ein familja hjálp. Nú eru fleiri.

– *Hvussu ber hetta til?*

– Kanska tí, at fólk nú vita um okkum. Tann besta „lýsingin" er, at fólk tosa saman. Vit eru saman við okkara fýra børnum, tá er lættari at koma í kontakt við okkum. Fólk kunnu eisini leita á netinum, tá er einfaldari at senda ein fyrispurning, sigur Henrietta.

– Tað er mest sum „tabu" at biðja um hjálp. So vit arbeiða sera professionelt. Tað er ein týdningarmikil uppgáva, at vit arbeiða uttan navn, sigur Sámal.

Viðurskiftini í Føroyum eru ikki so stór. Í bygdunum kenna øll hvør annan. Mong hava familju, sum stuðla. Men tá tað sansar at, er ikki lætt at fjala seg, sum ein kann gera í einum størri býi.

– Tað er altíð onkur sum treingir til stuðul. Og koma tey til Frelsunarherin, fáa tey altíð hjálp, sigur Henrietta.

Fólk við alkoholtrupulleikum hava fingið møguleika at sova hjá Frelsunarherinum. Eisini hetta er navnleyst. Tað er ament kent, at nýtslan av alkoholi er stór í Føroyum. Og nógv verður krógvað. So er eisini við sosialhjálpini.

– Í eini bygd, tá eitt fólk fær trupulleikar, hugsar viðkomandi ofta, at øll vita, hvat viðkomandi stríðist við. Tá er trupult at biðja um hjálp. Tí er av stórum týdningi, at alt verður gjørt í trúnaði, siga leiðararnir.

**Tað er ein, sum gevur styrki**

Av lyndi eru Henrietta og Sámal varin. At standa í eini fólkamongd, leiða eina guðstænastu ella eina jarðarferð er ikki bara, bara.

– Men vit hava roynt tað, sum stendur í Bibliuni; at „tá, ið eg eri veikur, tá eri eg sterkur". Vit eru ein lítil samkoma og vit eru hundrað prosent bundin av, at Gud er við. Gud arbeiðir gjøgnum menniskju, sum geva honum æruna.



Seyðurin er nógvur. Tað er umleið dupult so nógvur seyður sum fólk (uml. 52.000) í Føroyum. Við meira enn 100.000 seyðum er brúk fyri nógvum grasi. (Mynd: Mette Randem)



Mynd: Marit Dehli-Johannesen

**– Vit vera so leingi, tað er brúk fyri okkum. Vit kenna at vit gera eitt arbeiði, og fólk vilja hava okkum at vera her.**

**Henriette Midjord,**
*leiðari í Frelsunarherinum í Vági.*

Boð verða send eftir teimum til menniskju, sum hava djúpa sorg og kenna seg máttleys. Hvussu kunnu vit møta teimum á ein virðiligan hátt? Tað er tá, at tey hava kent, at tað er ein, ið hevur tikið yvir og givið teimum orð, sum eru til ugga. Sámal gloymir ikki orðini, hann fekk frá eini kvinnu, sum hevði mist fleiri: „Eg merki, at Gud, sum var so langt burturi fyri mær, áðrenn tú komst, hann er komin aftur."

Tað ger gott at kenna, at tey ikki eru einsamøll. Tað er ein, sum er við. Um hetta er úti á vegnum, í Heimaforbundinum ella á bønarmøti.

– Vit ynskja at geva Jesus víðari til onnur, at vera Guds longdi armur. Vágur er ikki stór bygd, men tað eru mong menniskju, sum hava brúk fyri Gudi. Kunnu vit vera eitt amboð, vilja vit so fegin vera tað.

– *Leggja tit til merkis, at fólk er opin yvir fyri Gudi?*

– Bæði ja og nei. Nøkur vilja fegin tosa, tá tey hava fingið eitt sindur av alkoholi. Nøkur eru søkjandi og onnur als ikki, sigur Henrietta.

– Vit eru eitt ættarlið har Gudstrúgvin er í minking, men fleiri av monnunum, sum koma til *Orðið á borðið*, minnast, at omman og abbin bóðu fyri teimum, sigur Sámal.

Ein partur av børnunum í bygdini eru greið yvir, hvønn tey trúgva á. Teimum dáma væl at koma í Frelsunarherin. Fyri stuttum vórðu seks juniorsoldátar innvígaðir. Hetta er nýtt.

– Vit vilja leggja tann góða boðskapin í børnini. Tá tey verða eldri, er óiva ikki so trupult at tosa um at verða soldátar.

Henrietta og Sámal eru ikki einsamøll í arbeiðinum. Tey hava um 20 trúføst hjálparfólk, soldátar og onnur, eitt gott toymi.

– *Hvat hugsa tit um framtíðina?*

– Vit vera so leingi her, sum tað er brúk fyri okkum. Vit kenna, at vit gera eitt arbeiði, og fólk vilja hava okkum at vera her, sigur Henrietta.

– Um tú spyrt: Er tørvur á, at Frelsunarherurin er í Suðuroynni? Ja, tað er altíð tørvur. Tú mást bara kenna, hvør tørvurin er.

Tey trívast væl og arbeiða í Frelsunarherinum hvønn dag.

– Mær dámar at vera eitt stað, har eg kann fara ein túr og hava møguleika at práta við fólk, sigur Sámal.

– Ja, hetta er tín náðigáva. ■



Í Tórshavn, høvuðsstaðnum í Føroyum, búgva fleiri enn 20.000 fólk. (Mynd: Andrew Hannevik)




– Eg kenni meg signaða av at bera menniskjum ein góðan boðskap, sigur Elisabeth Joensen, majorur. At selja Krigsropet førir til nógvar góðar samrøður, og fólk vilja fegin, at hon biður fyri teimum. (Mynd: Henriette Midjord)

# Krigsropet skapar kontakt

Eg elski at selja Krigsropet í SMS í Tórshavn, sigur majorurin Elisabeth Joensen. Mitt í allari mannfjøldini eru menniskju opin og biðja um forbøn.

**Tekstur:** Marit Dehli-Johannesen

– Tað er sum, at eg havi eitt fríøki rundan um meg. Tað eru so nógv, sum vilja tosa við meg, sigur tann eftirlønti offiserurin í Frelsunherinum í Havn.

– Eg møti fólkum, sum eru glað, fólkum, sum eru ólukkulig, menniskju sum ynskja Guds signing og sum takka mær fyri Frelsunarherin. Nøkur siga: „Eg eri so ólukkulig, eg eri í kreppu. Kanst tú biðja fyri mær?“ Tað eru ikki so fáar bønir, eg havi biðið.

Ofta hevur hon vent ryggin móti fólkarúgvuni, lagt hendurnar á viðkomandi, sum bað um forbøn, og biðið eina bøn.

– Fyrst og fremst ynski eg at vera eitt medmenniskja. Mær dámar væl at lurta eftir fólki. Menniskju í dag hava ein longsul eftir onkrum, eftir Gudi, eftir friði. Eg trúgvi, at Gud hevur skapt okkum øll. Og vit fáa ikki frið, fyrr enn vit koma til hansara. Vit møta øll ymiskum trupulleikum, men hann hevur lovað at vera við í øllum spurningum, sum vit hava, hann er við í gerandisdegnum. Tí farið eg uttan at óttast út við Krigsropet.

Hon hevur lagt til merkis, at nú, tá fleiri ferðast úti á netinum, so eru fleiri, sum kenna til einsemi. Fólk hava minni tíð, vitja ikki hvønn annan so nógv sum fyrr og samskifta heldur á netinum. Men hetta gera ikki øll og nøkur falla niður millum tveir stólar. Tá vil Elisabeth vera har.

**Dagurin í dag**

– Eg ynski at umboða Gud og Frelsunarherin. Og eg havi ein boðskap, sum kann hjálpa, men eg ynski ikki at pranga trúnna til nakran, sigur hon.

Hetta leggja fólk til merkis. Ofta tosa fólk um gerandisdagin, men skjótt koma tey inn á lívsins sárbaru síður. Fleiri tora at lætta um trýstið og tey fáa sett orð á tað, sum nívir. Elisabeth fær lut í bæði sjúku og samskiftisbrotum, og hon veit, hvar hon skal leggja alt, hjá Gudi.

– Eg minnist eini hjún, sum himpraðust at koma til mín og fortaldu, at annað av teimum hevði fingið eina álvarsama sjúku. Tá bað eg fyri teimum og eggjaði teimum til at taka ein dag í senn.

Hvar hon so hevur búð, um tað hevur verið í Noregi ella í Føroyum, so er hon altíð farin út við Krigsropet. Hon er altíð væl fyrireikað og hevur lisið allar greinarnar í blaðnum. Áðrenn hon fer út, biður hon um Guds signing. Men av og á kennir hon tó, at tað er ikki lætt at standa við Krigsropet.

– Men hvørja ferð kenni eg meg signaðan, tá eg komi heimaftur. Summar dagar hendir ikki so nógv, men eg komi ongantíð heimaftur og føli meg tóman. Eg verið ríkað av at standa við einum góðum boðskapi til menniskju.

Elisabeth smásmílist, tá hon sær, at tað eru nøkur sum royna at sníkja seg fram við henni.

– Tá sigi eg við tey, at teimum ikki treingir eina ringa samvitsku. Eg standi har, tí at eg havi eitt gott tilboð.




Elisabeth Joensen fær samband við bæði smá og stór tá hon selur Krigsropet. (Mynd: Astrid Hansen)

**Positivur lesnaður**

Krigsropet, vikublaðið hjá Frelsunarherinum, verður eisini lisið í Føroyum.

Bløðini koma ofta nakrar dagar seinni enn útgávudagin. Men Elisabeth fer tó út við einum dunga og kemur ikki aftur fyrr enn hon hevur selt øll bløðini.

Elisabeth sigur, at summi halda, at blaðið bara skal verða selt. Men eg síggi hetta sum ein møguleika at evangelisera.

Hon leggur eisini til merkis, at onkur kundi hugsað sær eitt blað, men hava ongan pening. Tá gevur hon teimum eitt blað. Tað er altíð onkur sum gevur henni meira enn hvat blaðið kostar. Øll árini havi eg hildið, at tað at selja Krigsropet er ein góður møguleiki at bera ein góðan boðskap. Bløðini eru góð og hava ein positivan boðskap. Tað er altíð gott at hava nakað gott og positivt at vísa fram. ■



4 ungir soldátar í Frelsunarherinum í Havn. Vinstrumegin frá: Helena Léonsdóttir Kjærbæk, Karinbeth Léonsdóttir Kjærbæk, Herdis Højgaard Petersen, og Karin Elisabeth Petersen.

# Mótvektin

Seks ung í Havn vita hvat tey vilja. Og tey eru ikki bangin fyri at hava eina aðra mentan.

**Tekstur og mynd:** Marit Dehli-Johannesen



– Eisini ung, sum ikki ganga í nakrari samkomu, koma higar.

Karin Elisabeth Bernhardsdóttir Petersen (19)

– Vit brenna fyri, at onnur skulu koma at kenna Jesus, sigur 19 ára gamla Helena Leonsdóttir Kjærbæk, sum er soldátur í Frelsunarherinum í Havn.

Rundan um hana sita fimm onnur ung. Tey hava sama ynski. Annaðhvørt hóskvøld bjóða tey vinum, floksfeløgum og ungum, sum tey venja saman við, at koma í ungdómsklubban hjá Frelsunarherinum.

Tey bjóða eisini ungum, sum ikki ganga í nakrari meinigheit. Verða tey kend við Jesus, er tað ógvuliga gott, sigur 19 ára gamla Karin Elisabeth Bernhardsdóttir Petersen.

Tann fasta kjarnin í ungdómsklubbanum hjá Frelsunarherinum í Tórshavn ynskir at fáa fleiri við. Frá vinstru: Systrarnar Helena og Karinbeth Leonsdóttir Kjærbæk, Lukas Djurhuus Olsen, Herdis Højgaard Petersen, Eva Djurhuus Olsen og Karin Elisabeth Bernhardsdóttir Petersen.

Í ungdómsklubbanum spæla tey borðtennis og brettispøl, tey hava eina stutta andakt og hugna sær við góðum mati. Koma fólk?

– Ja, siga ungdómarnir.

Við hvørt eru eini 10 -15. Og tað hendir, at stovan er fylt við 20 ungum.

– Tað er lætt at fáa onnur við. Vit siga bara, at tað er so hugnaligt og gott í klubbanum. Og vit eta saman góðan mat, sigur Helena.

Andaktin er stutt og einføld.

– Fólk eru positivt ovfarin og siga, at tað er so hugnaligt at vera her, sigur Karin Elisabeth.

– Og fólk koma eisini við á legu. Tá verður farið sum vanligt í eina svimjihøll, nógv sosialt virksemi og helst ein túrur við einum seglbáti, sjálvt um vindmegin er 17.

– Hetta er vanligt í Føroyum, flenna ungdómarnir.

**Tað er cool at vera soldátur**

18 ára gamli Lukas Djurhuus Olsen er einasti drongur, sum er í ungdómsklubbanum, men tað ger onki.

– Hetta er gott! sigur hann og smílist.

– Tað er gott at vera saman við fólki, sum eru á sama aldri sum eg.



– Tað er so hugnaligt at spæla saman, siga tey ungu í horntónleikinum hjá Frelsunarherinum í Tórshavn. Dirigenturin Jóhanna Sofía Petersen (vinstrumegin) gongur undan.

Lukas dugir væl at spæla borðtennis, siga genturnar.

Lítlasystir hansara, Eva, ið er 13 ár, hugnar sær við at spæla Yatzi, Sequence og Ligretto. Um eitt ár gleðir hon seg at gera sum onnur, at verða soldátur í Frelsunarherinum. At vísa hvønn tey trúgva á og hvar tey hoyra heima. Hetta er av týdningi í hesum hópinum. Fýra av gentunum og Lukas eru longu soldátar í Frelsunarherinum.

Eg havi leingi vitað, at eg skuldi verða soldátur. Tað var bert ein spurningur um nær, eg var ikki í iva. Her eri eg uppvaksin, omma og abbi og foreldrini hjá mær eru soldátar. Eg vil vera her og gera tað sama sum tey, sigur Helena.

Henni dámar væl at vera í eyðkennisbúna, tí tá vísir hon, hvar hon hoyrir til.

Vit eru ofta úti og syngja og spæla. Tá steðga fólk á og spyrja, hvørji vit eru. Hon flennir og heldur, at hetta er so cool.

Eldri fólk kenna Frelsunarherin, men nøkur av teimum ungu spyrja, hví tey ganga í eyðkennisbúna. Nøkur halda, at tey eru í tí danska herinum, tí í Danmark er herskylda, men ikki í Føroyum.

Vit eru tænastufólk Harrans og soldátar í Frelsunarherinum. Tað er tað, sum vit hava sagt ja til. Eyðkennisbúnin er ein vitnisburður í sjálvum sær, hann peikar móti frelsuni, sigur Helena.

Tey vilja luta tað týdningarmesta í lívinum, trúnna á Gud.

Hetta gera vit fyri tað mesta gjøgnum horntónleik og sang. Tá vit spæla fyri øðrum, spæla vit fyri Jesus, fyri Harran. Hetta hevur fyrstu raðfesting, tá vit fara út, sigur hon.

### Hava eina aðra mentan

Tey vilja eisini vísa øðrum, at tað ber til at liva uttan at verða rúsaður.

Her í Føroyum er ofta alkohol við, tá fólk eru til eina veitslu. Um fólk tapa ella vinna í ítrótti, er ofta alkohol við. Men vit nýta ikki alkohol, og vit vilja vísa øðrum, at tað ber væl til at liva í einum rúsfríum umhvørvi, siga tey.

Ungdómarnir fara eisini til veitslur. Tey halda, at tað er ikki so trupult at siga nei til alkohol. Og út móti midnátt fara tey aftur til húsa, ódrukkin.

Og vit verða vird. Vit hava tað stuttligt uttan alkohol. Fólk, sum hava drukkið alkohol, hava tað ikki so gott næsta dagin. Men hetta sleppa vit undan.

Onnur koma ofta til tey og spyrja, hvussu tað er at vera soldátur.

Fólk eru sera forvitin, sigur Karin Elisabeth.

*Hvussu er at tosa við onnur um lívið, sum tit hava saman við Gudi?*

– Eg havi tað lætt við at tosa við onnur um Jesus, men tað er kanska ikki so lætt hjá øðrum at skilja. Tað eru mong, sum ikki vilja tosa um hetta, tí tað verður í so djúpt og nærgangandi. Ein partur veit, at tað sum Frelsunarherurin ger, er gott, men tey verða í so fráverandi, tá vit koma inn á trúgv. Hetta er ikki so einfalt, sigur Helena.

– Vit vilja heldur ikki ræða tey burtur. Men spyrja tey, so eru vit altíð fús at lurta, sigur Elisabeth.

### Kenna hjástøðuna

– *Hvat týðir tað fyri tykkum, at tit hava eina trúgv?*

– Eg kenni, at eg havi ein sera góðan vin, sum eg altíð kann tosa við. Hetta er gott at hava. Eg gangi og práti við Gud alla tíðina. Hann hoyrir meg. Tað er sum at hava ein „vanligan“ vin. Eg tosi við hann um tað, sum eg hugsi um. Og á møtum kenni eg, at hann er hjá mær, sigur Karin Elisabeth, og Helena játtar: Ja, eg kenni hetta alla tíðina, serstakliga á møtum, tá vit syngja. Tá kenni eg, at Gud er hjástaddur. Hann er sera týdningarmikil fyri meg. Tað hevur hann verið alt lívið. Hann hevur verið við mær.

Karin Elisabeth sigur, at tað er nógv, sum Jesus hevur gjørt fyri hana.

– Tá eg hyggi aftur á tíðina, sum hevur verið trupul, tá síggi eg, at hann hevur hjálpt mær. Tá takki eg honum, at hann gav mær góðan stuðul. Kanska eg ikki sá tað tá, men nú síggi tað.

Helena hevur skilt, hvussu Gud hevur verið við familjuni hjá henni.

– Uttan Gud hevði eg ikki kunna verið her, sigur Helena. Gud hevur verið hjá okkum í fleiri ættarlið. Eg eri so takksom fyri, at hann leiddi mína familju í Frelsunarherin.

Lukas og Eva hava ikki so langa søgu, men tey eru glað, at foreldrini hjá teimum fóru í Frelsunarherin og eru har.

### Familjuorkestrið

– Hvussu við framtíðini? Vera tit verandi úti í Atlantshavinum, mitt millum Noreg og Ísland?

– Vit elska at búgva í Føroyum og kenna okkum knýttan at fólkinum her, siga tey.

Helena og Karin Elisabeth eru lidnar við framhaldslestur. Tær kundu hugsað sær at sæð meira av heiminum, áðrenn tær fara at lesa víðari. Kanska Helena fer á læraraskúla, meðan Karin Elisabeth hevur ætlanir at læra til kosmetolog. Hini ætla at arbeiða við menniskjum, at vera lærarar og sjúkrarøktarfrøðingar.

– Eg ætli mær at vera bilmekanikari, sigur Eva.



Horntónleikurin hevur stóran týdning fyri felagsskapin. Fólk í øllum aldri hugna sær saman. Hvørt sunnukvøld eru 20 tónleikarar klárir, og mjúkur brasstónleikur fyllir møtisalin í Tórshavn.

**– Serliga á møtum tá vit syngja, kenni eg, at Gud er nær. Hann hevur stóran týdning fyri meg. Tað hevur hann havt alt lívið. Hann hevur verið við mær.**

**Helena Leonsdóttir Kjærbæk,**
*virkin í ungdómsbólkinum hjá Frelsunarherinum í Tórshavn*

Kanska hevur hon fingið íblástur frá beiggjanum Lukasi.

Fyribils eru seks ungdómar, sum vilja vera í Frelsunarherinum. Her eru tey vaksin upp, hava gingið í sunnudagsskúla og verið í barnakórinum. Nú hjálpa tey til, har tørvur er. Í dag venur hornorkestrið. Í einum grannahøli hoyrast djúpir barytónar og Jóhanna Sofía Petersen, sum er dirigentur, ger seg til reiðar.

– Vit eru glað fyri horntónleikin. Tað er so hugnaligt at vera saman við øðrum, sigur Karin Elisabeth. Bæði mamman og omman spæla bass. Hini hava eisini foreldur, sum eru í hornorkestrinum. Hetta er sum eitt stórt familjuorkestur.

Dirigenturin hyggur yvir á tey ungu og smílist vælnøgd: Hetta er ein frálíkur bólkur! ■



– Eg havi fingið lívsgleði. Hvønn dag møti eg glaður til arbeiðis. Eg havi tað gott, sigur Dánjal. Saman við Heidi Tvørfoss arbeiðir hann við torførum evnum og leggur nýtt støði uttan rúsandi evni. (Mynd: Marit Dehli-Johannesen)

# Ein ferð

**Tekstur:** Marit Dehli-Johannesen

Dánjal fekk pláss á Frælsi, tá lívið gjørdist ein stór fløkja. Hetta bjargaði honum.

– Eg havi altíð stríðst við at hava álit á mær sjálvum og havi hildið med burtur. Men nú veit eg, hvat eg kann og fjali meg ikki. Nú tori eg at vísa, hvør eg eri.

24 ára gamli Dánjal situr í skinnsofuni og smílist. Tann langi hondbóltsspælarin tosar opið um tíðina, tá rúsurin fór avstað við mestu tíðini. Seinastu tvey árini hevur hann arbeitt tilvitaður um hugsanir og kenslur. Skift út negativar hugsanir við setningar, sum byggja hann upp. Hann ger ikki hetta arbeiðið einsamallur.

Hvønn týsdag møtir hann Heidi Tvørfoss, sum er sjúkrarøktarfrøðingur, í Frelsunarherinum í Havn. Her, í tí stóra spælihølinum hjá børnunum, tosa tey álvara. Saman hyggja tey eftir, hvat er hent seinastu vikuna og finna fram til, hvat tey skulu gera frameftir.

– Hvussu gongur? Hvussu hevur vikan verið? Hevur tú sovið? Hevur tú verið til arbeiðis? Hevur tú etið? Hevur tú ruddað upp eftir tær?

Heidi Tvørfoss gevur honum nærgangandi og ófjálgar spurningar. Hetta er av stórum týdningi. Hetta vita Dánjal og fimm onnur, sum Heidi arbeiðir við.

Tá samrøðurnar eru um at vera lidnar, spyr hon altíð, um okkurt var í so ófjálgt, so at vit fáa rudda vegin frameftir. Hetta er eitt samstarv, har vit ikki eru dømandi, sigur sjúkrarøktarfrøðingurin á Frælsi. Viðgerðarstovnurin Frælsi er eitt ókeypis tilboð til ung við rústrupulleikum. Tey hjálpa ungum at fáa eina nýggja byrjan upp á lívið.

Eina ferð um vikuna fer hon av Eiði og til Havnar. Á Frælsi hevur gingið væl. Á Frælsi sleppa tey ikki teimum ungu, tá viðgerðin er liðug á stovninum. Men hava samband við tey. Hetta hevur gjørt, at ein stórur partur klárar at liva eitt rúsfrítt lív.

Tað týdningarmesta er ikki hvussu nógv, men hvussu tey liva, sigur Heidi.

**MOVE**

Í viðgerðini nýta tey danska modellið MOVE, sum hevur sum endamál at enda, ella at minka, rúsnýtsluna hjá teimum ungu. Viðgerðin gongur eftir einum ávísum leisti. Vegleiðarin og tey ungu arbeiða saman at fáa burtur sinnisligar, fysiskar og sosialar forðingar. Tey hyggja eftir, hví tey eru bundin, og hvat tey eru før fyri sjálvi at gera, til tess at broyta atburð. Dánjal er heilt greiðir yvir, hvat ið hevur størsta týdning fyri hann:

– Tað er hjálpin, sum eg havi fingið frá Heidi, at broyta mínar hugsanir. Serstakliga byrjanin av hesum avtalunum hevði sera stóran týdning fyri meg. Tað var ein stuðul at vita, at eg skuldi higar beint eftir halguna. Hetta steðgaði mær at gera eitthvørt býtt og minti meg á alt, ið eg hevði verið ígjøgnum.

Heidi er lærd í kognitivari viðgerð og hjálpir teimum ungu at fanga negativar sjálvvirkandi hugsanir. Og eisini at arbeiða við kenslum og atburði.

– Tað sum hjálpir, er samstarv millum starvsfólkini og tey ungu. Vit mugu verða samd um, hvat tey vilja, vit kunnu ikki áseta, hvat tey skulu. Alla tíðina eru vit í samskifti við tey ungu og leggja til rættis, sum er hóskandi fyri hvønn einstakan. Nøkur hava tørv á fleiri viðgerðum, áðrenn tey broyta kós. Viðgerðin er ein heildarviðgerð. Tað eru ikki bert rúsevnini, sum eru til viðgerðar. Vit arbeiða t.d. við Dánjali, at hann skal hava eina útbúgving.

– Og sjálvsálit. Eg eri veruliga broyttur seinasta

**Frælsi**

- Eitt rúsviðgerðartilboð, sum Frelsunarherurin í Føroyum bjóðar ungum.
- Samdøgurskipanin hevur átta pláss til ung millum 18 og 30 ár.
- Eitt heildartilboð, sum snýr seg um kognitiva terapi og umhvørvis terapi.
- Vekt verður løgd á kropsliga venjing við túrum í náttúruni.
- Hava ambulanta viðgerð við uppfylging av fyrrverandi sjúklingum og ungum, sum ikki hava verið á samdøgurskipanini.





– Túrarnir úti í náttúruni eru góðir. Har fái eg frið og gloymi mínar trupulleikar. Tá hugsi eg bara um næsta stig, sigur Dánjal. Hann hevur verið við á fleiri gongutúrum, sum Frælsi hevur skipað fyri. (Mynd vinstrumegin: Mette Randem, mittasta myndin: Frælsi)





Fiskiførini, sum umboða Føroya týdningarmesta vinnuveg, eru ein vanlig sjón á firðunum.(Mynd: Mette Randem)

hálva árið. Eg eri meira støðugur, meira lívsglaður og meira positivur um meg sjálvan, sigur Dánjal.

Seinasta ár fekk hann lærugreinabræv til autolakering. Hann hevur eitt gott starv og fyllir frítíðina við meining. Og hóast tað, so eigur hann at ansa væl eftir, hvat gongur fyri seg innan í honum.

– Hugsanir okkara ávirka kenslur okkara. Um eg sigi við meg sjálvan: „Eg eri býttur, eg eri býttur“, so verði eg keddur og gerðir mínar eru hareftir. Ofta eru vit ikki tilvitað um, at vit hugsa negativar tankar. Tað er um at finna eitt annað huglag, sigur Heidi.

**Náttúran sum lekjari**

„Túrarnir úti í náttúruni hava verið teir allar bestu“, siga øll tey, sum havi verið til viðgerð á Frælsi.

Tí tað hendir nakað bæði við hugsanum og kenslum, tá vit lata okkum í skógvar, sum eru góðir at ganga í úti á teimum grønklæddu víddunum, og vit fáa eitt gott útsýni til allar síður. Ella vit fara ein túr niðan á 882 metra høga Slættaratind, hægsta fjall í Føroyum.

Viðgerðarheimið er á Eiði og liggur nær við ein gamlan víkingabústað. Fyrr vóru fólk send niður til Danmarkar til viðgerðar. Men fyri árum síðani verður viðgerðin givin í Føroyum.

Her úti í náttúruni leggja tey til merkis, at eitthvørt hendir við teimum. Úti í náttúruni er væl av fugli, har eru djúpar gjáir og brattir hamrar og rundan um oyggjarnar er eitt brúsandi hav. Á Frælsi fara tey, sum orka, túr, sum ofta taka um fimm tímar. Ágóðin er „ókeypis“ venjing at flyta fokus.

**Hvat er við náttúruni, sum ávirkar sinnalagið?**

Har koma nýggjar hugsanir av sær sjálvum. Stendur

**– Eg havi fingið støðufesti, lívsgleði og eina meira jaliga sjón av mær sjálvum.**

Dánjal,
*fyrrverandi sjúklingur á Frælsi.*



Frælsi liggur væl fyri á Eiði, við tøttum sambandi við hav og fjøll. (Mynd: Frælsi)

tú uppi á einum fjallatindi og hyggur rundan um teg, tá hevur tú hug at fara á flog. Tú gloymir alt tað, sum er tungt, tú fært natúrligt dopamin, gleðishormon heilans, sigur Heidi.

Hon vísir til eina norska kanning, sum sigur, at rørsla er góð fyri tey, sum eru bundin av rúsevnum. Serliga tey, sum ganga úti í náttúruni, geva góð úrslit. Nakrar ferðir um árið fáa tey, sum eru til viðgerðar á Frælsi, ein túr við tyrluni at síggja Føroyar frá í erva.

Tey raskastu fáa eisini møguleikan at svimja á sjónum. Hitin í sjónum er um 5 til 10 stig Celsius.

Fyri summi er hetta sjokkterapi. Tvær ferðir at fara undir kav, var nógmikið hjá Dánjali. Honum dámar betur at fara ein túr til fjals.

– Har fái eg frið og gloymi trupulleikarnar.

Eitt tiltak, hann tekur heim við sær.

**Ein ferð**

Dánjal skal víðari. Hann droymir um at fáa sær egin hús og sítt egna firma. Fyri tveimum árum síðan tordi hann næstan ikki at hugsa um framtíðina. Rúsurin var í ferð við at oyðileggja lívið, hann orkaði ikki at liva longur.

Hvussu ber tað til, at ein ungur ítróttaunglingi datt so djúpt? Dánjal var í læru og var 19 ára gamal, tá ein vinur bjóðaði honum pillarar í samband við eina veitslu. Eftir hetta bleiv nógv rúsevni hvørt vikuskifti. Fleiri í Føroyum stríðast við rústrupulleikar. Fleiri ung byrja tíðliga, tey nýta bæði alkohol og onnur tyngri evni.

– Alnetið hevur stóra ávirkan. Eg kom tíbetur ongantíð í tað harða umhvørvið, og eg var ein, sum ikki var so nógv saman við øðrum, sigur Dánjal.

Hann visti, at rúsevni góvu skjóta ávirkan. Endiliga

kundi hann doyva pínuna og gloyma sín til tíðir trupla uppvøkstur.

– Hetta var ein roynd at rýma frá øllum. Eg vildi fáa mær eina falska gleði.

Men gleðin var stokkut. Hann gjørdist meira og meira niðurtyngdur, og eftir tveimum árum royndi Dánjal at taka sítt egna lív, men tað miseydnaðist. Hann varð innlagdur á psykiatrisku deild. Varð sendur heim, var á einum øðrum viðgerðarstovni, men skilti, at hann trongdi til meira. Tað var tá, at ein vinur vísti honum á Frælsi. Hann var heppin, hann varð skrivaður inn.

Teir fyrstu dagarnar skrivaði hann eina vikuætlan. Hetta hjálpti honum at skriva alt niður, sum hann gjørdi. Eisini fyri at fáa ordan í heilanum. Tá tað varð funnið, at hann hevði ADHD, fóru fleiri brikkar upp á pláss, og Dánjal fekk rættan heilivág. Hann tosaði við ein sálarfrøðing, var í bólki saman við øðrum og arbeiddi saman við Heidi, sum bleiv hansara fasti vegleiðari.



– Mín størsta grundgeving fyri at arbeiða við hesum, er at síggja, at ung kunnu fáa eina heilt nýggja byrjan upp á lívið, sigur sjúkrarøktarfrøðingurin Heidi Tvørfoss. Hvønn týsdag er hon í Frelsunarherinum í Tórshavn, har hon tosar við seks ung, har Dánjal er ein av teimum, sum eru í ambulantari viðgerð. (Mynd: Marit Dehli-Johannesen)

Honum dámdi eisini væl morgunandaktirnar á Frælsi.

– Eg lurtaði og tók ímóti. Hetta var ein góð byrjan til dagin. Og gott var, at andaktirnar vóru stuttar, smílist Dánjal, tí hann stríðist við at savna seg um tað, sum hann hoyrir.

Prestur kemur eina ferð um mánaðin og tað gera eisini fólk frá Frelsunarherinum. Á Frælsi eru týdningarmikil virðir, sum eru við í viðgerðini. Vit ansa hvør eftir øðrum og vísa umsorgan og kærleika, sigur Heidi.

Hetta hevur Dánjal lagt til merkis. Men eftir tveimum mánaðum var hann klárur og vildi sleppa heim. Kundi hetta ganga væl?

– Eg var heppin við menniskjum, sum vóru rundan um meg, eg havi ein góðan vinaskara. Eg byrjaði aftur at spæla hondbólt. Eg hevði eitt lærupláss og helt áfram at læra at lakkera.

– *Var tað trupult at liva rúsfrítt?*

– Ja, í byrjanini var tað trupult. Eg skuldi í veruleikanum broyta alt lívið hjá mær. Fyrstu tíðina var sum um, at eg hevði mist nakrar vinir. Í vikuskiftunum visti eg ikki, hvat eg skuldi gera, men eg vandi bæði hondbólt og fitness. Og tað hjálpti mær nógv. Tað var eisini ein fyrimunur at hava annan áhuga, tí har fekk eg nýggjar vinir.

### Tøk 24/7

Hann helt fram við MOVE-viðgerðini. Hvørja viku gevur Heidi honum nýggjar uppgávur: Tað kunnu vera fastar venjingar ella at arbeiða meira við tonkunum. At skriva vikuætlan er framvegis ein góð venjing.

– Fremsta mál mítt er, at tey ungu skulu fáa tað betri, sigur Heidi.

Tað er týdningarmikið at halda fast við tað, sum gongur væl. Tað er tað bráða lyndið sum ger, at fleiri fáa trupulleikar. Tí er tað trygga avgerandi, at fylgja við og serliga í góðum tíðum. Hava vit livað støðuleys alt lívið, kann tað støðufasta kennast ótrygt.

Fyri Dánjali er tað tryggjandi at vita, at Heidi er har. Hann kann altíð senda henni eini boð, og hon svarar skjótt aftur. Eisini tá feria er, er hon tøk.

– Tað er ongin trupulleiki fyri meg um tey ungu senda eini boð til mín seint á degi. Hetta hendir ikki ofta. Tað er verri, at tey fáa eitt afturstig. Hava tey møguleika at ringja og tosa, kunnu vit steðga tí beinanvegin.

Dánjal minnist hina ferðina hann fall í samband við ein jólafrokost. Piprandi setti hann seg í samband við Heidi, sum eggjandi bjóðaði honum at koma við á næsta fjalstúrin.

– Hetta bleiv ein langur túrur bæði við regni og mjørka, og vit stríddust at finna heimaftur. Men longu dagin eftir hevði eg tað nógv betri. Eg var sum nýggjur, og hann smírist.

Nú kennir hann til trupulleikarnar. Sum tá eg skuldi á eina veitslu hjá einum hondbóltsvini.

– Tá ringdi eg til Heidi og segði, at eg hevði lagt til merkis, at her kundi enda galið. Tá avtalaði eg við Heidi, at eg skuldi kontakta hana, tá eg kom aftur frá







Úti á teim grønu víddunum í Føroyum, fáa tey ungu góða kropsvenjing. Í fimm tímar klatra tey upp og niður á fjøllunum og njóta útsýnið út á hav. (Mynd: Frælsi)

veitsluni. Um 11- tíðina um kvøldið ringdi eg til hana og segði frá, at nú koyrdi eg heim. Eg hevði ikki drukkið.

Heidi lyftir peikifingrinum upp móti høvdinum: – Tað er altíð her, í tonkunum, at fallið byrjar. Tí hevur tað so stóran týdning at ringja beinanvegin. Meira tú arbeiðir við tonkunum, meira lærir tú.

### At broyta lyndishátt

„Eg eri tann, eg eri. Eg veit, at eg kann!“ Hetta er nakað av tí, sum Dánjal sigur.

– Merkiligt at hetta hevur hjálpt. Í byrjanini segði eg hetta tríggjar ferðir um dagin. Seinni, tá eg ikki hevði tað so gott, tók eg tað framaftur, og tað hjálpti beinanvegin. Tað skal ikki so nógv til, at sinnið broytist.

– *Hvussu hevur tú tað, um tú fært hug at fáa tær ein rús?*

– Eg havi tað gott. Tá tað eru veitslur ella dystir, kann eg kenna, at eg verið drigin, men tá steðgi eg tonkunum. Øll í felagnum kenna mína søgu. Tað er betri, at fólk vita, hvussu lívið hjá mær hevur verið. Eg eri opin um mínar trupulleikar yvir fyri teimum, sum eg komi saman við og á mínum arbeiðsplássi. Tá skilja tey og hava møguleika at hjálpa mær, um so skuldi verið.

Hann smílist: – Tá eg hyggi afturá hevur alt gingið skjótt fyri seg. Onkur sprekka hevur verið, men tá hava tað mest verði „moralskir timburmenn“. Størsta broytingin var, tá eg var liðugur við útbúgvingina. Eg havi fingið lívsgleði. Hvønn dag fari eg glaður til arbeiðis. Eg havi tað gott og kenni, at eg eri á røttum stað, sigur Dánjal.

**– Seinasta árið hava vit mest arbeitt við eginvirði, sjálvsáliti og at hava frið við seg sjálvan – uttan at verða rúsaður.**

**Heidi Tvørfoss,**
*sjúkrarøktarfrøðingur á Frælsi*

– *Hvat gert tú, tá tú hevur ein vánaligan dag?*

– Eg venji. Likamlig venjing hjálpir altíð. Er meira, so fari eg ein túr út í náttúruna.

Hann hevur lagt til merkis, at tað er longri millum teir tungu dagarnar. Heidi vísir honum á, hvør orsøkin er: Hann dugir betur at broyta, hvussu hann ber seg at og eisini tað, sum brýtur niður.

– Eg dugi betur at broyta vánaligar dagar, so eg ikki hugsi negativt. Og tó kunnu ganga tríggir dagar, at eg havi gingið við negativum hugsanum, uttan at eg havi givið tí gætur. Men tá havi eg tíbetur verið førur fyri at støðga á, áðrenn teir verða ov stórir.

Heidi: – Seinasta árið hava vit mest arbeitt við eginvirði, sjálvsáliti og at hava frið við seg sjálvan – uttan at verða rúsaður.

– *Hvat hendir við tær sum viðgerði, tá onkur stríðist og rivur koma í?*

– Tá havi eg tað ikki gott. Tí sigi eg við fólk, at tey altíð kunnu senda eini boð ella ringja. Tey skulu ikki ganga eina heila viku og ikki hava tað gott. Tað er av stórum týdningi at halda sambandið.

Fyri hana sjálva er gott at vita, at hon veit, hvar hon kann leggja frá sær tað, sum ikki gongur eftir vild, hjá Gudi.

– Tá eg ikki havi tað gott, er onga aðrastaðni at fara, sigur hon hugsanarsom.

Tá sigur hon og smílist: – At síggja, at Dánjal hevur fingið tað betri, heldur mær uppi! ■

– Eg eri komin burtur úr hesum og vil geva nakað aftur til tey menniskjuni, sum eru í somu støðu, sum eg einaferð var í, sigur Martin Kúrberg, leiðari á Herberginum, bú- og arbeiðsvenjingarstaðnum hjá Frelsunarherinum í Tórshavn.

# Rúsumsorgan persónlig

„Um eg nakrantíð komi út úr hesum, so vil eg geva lív mítt at hjálpa øðrum menniskjum." Martin Kúrberg gav Gudi eitt lyfti. Hetta hevur hann hildið.

**Tekstur:** Marit Dehli-Johannesen **Mynd:** Mette Randem

Eg má taka meg saman, segði ein ung genta og tveitti seg niður í hornasofuna.

Hon er útlúgvað, rúsurin er farin avstað við henni í fleiri ár.

Hevði hetta verið so einfalt, so hevði tú tikið teg saman fyri langt síðan. Sig heldur: Eg vil royna at geva mær sjálvum ein møguleika at broyta meg, uggar Martin Kúrberg. Martin er leiðari á Herberginum í Havn. Herbergið er partur av virkseminum hjá Frelsunarherinum. Tilboðið fevnir um: Herbergs kømur, umsorganarheim, dagtilhald, hitastovu, búfelagsskap og mat og annað til familjur og einstaklingar í trongd.

Hann stendur úti í hitastovuni í lívd av regni og vindi.

– Hetta er besta staðið, eg veit um. Her fái eg hita, reinlyndi og kærleika. Her hitta vit øll sløg av menniskjum: Onkur hevur havt sítt egna virki, har hava verið verkfrøðingar og skiparar. Øll hava eina forsøgu. Tí er tað av týdningi, at eg eri førur fyri at tosa við øll, sum eru her.

Jonny er ein av teimum. Hann hevur verið professari og hevur undirvíst í støddfrøði og alisfrøði á hægri lestri og á fróðskaparsetri í Danmark. Seinastu trý-fýra árini hevur hann búð á Herberginum.

– Eg veit ikki, hvat eg skuldi gjørt, um eg ikki hevði henda møguleikan. Tað hevur nógv at týða fyri meg, at eg kann búgva her. Heimasjúkrasystirin kemur her hvønn dag, sigur hann og styðjar seg framá stavin. Jonny er álvarsama sjúkur av krabba. Men í hitastovuni og á Herberginum fylgja tey honum í tí, sum honum treingir til.

Eftir at hann kom heim frá seinasta arbeiðsstaðnum í Grønlandi, var hann uttan bústað og endaði á sjúkrahúsi.

Meðan eg var har, kom Martin. Hann spurdi, um eg vildi búgva her.

Síðan hevur hann havt eitt trygt stað at sova í.

**At verja tignina**

– Vit hjálpa fólki at hava umsorgan fyri sær sjálvum og at tosa við sóma við seg sjálvan. Tignina mást tú ongantíð taka frá einum menniskja. Hana skulu vit verja, sigur Martin Kúrberg.

Rundan um hann sita fólk í leðursofum, meðan ▸










– Mítt hjarta brennur fyri íbúgvunum og eg ynski at møta teimum, har *tey* eru, ikki har *eg* eri, sigur Martin Kúrberg. Hann fær ofta eitt gott prát við Jonny, sum hevur búð her leingi. (Mynd: Marit Dehli-Johannesen)

– Tað einasta vit krevja her á Herberginum er, at vit hava virðing fyri hvør øðrum, sigur Martin Kúrberg.

tubaksroykurin er sum eitt grátt skýggj ímillum tey. Teir flestu eru menn. Nakrir spæla skakk, aðrir hyggja í sjónvarp, ella rassast óstúttir á beinunum at koma yvir í køkin, har grýtan við høsnarungum bíðar. At fáa kroppin við, er ikki bara, bara, tá rúsurin hevur herja. Martin tekur undir armin og hjálpir einum manni við andlitinum fullum av sárum og skeinum. Lívið úti á gøtuni kann vera hættisligt. Her fáa fólkini eitt andarhald. Tann, sum er á vakt, ein fyrrverandi løgreglumaður, er ikki í iva: – Tað er betri at vera saman við fólki, enn at fara eftir teimum, sigur hann.

Frá klokkan nýggju um morgunin til klokkan nýggju um kvøldið eru um 30 fólk, sum hava verið í hitastovuni. Hetta eru bæði fólk, sum eru bundin av rúsi, einslig og sálarliga sjúk. Á vegginum hongur eitt endurprent av einum málningi eftir Rembrandt, sum sýnir tá *hin burturfarni sonurin* kemur heim. Fólk skulu vita, at her eru tey vælkomin. Á bonkinum stendur altíð kaffi, køkur og breyðflísar.

Samband er ikki nakað tú fært, men nakað sum tú hevur uppiborið. Av tí, at eg áður havi verið rúsaður, verður latið upp fyri mær í felagsskapinum. Vit tosa sama mál, sigur leiðarin.

At tosa liggur ikki so væl fyri í dag. Martin er júst skurðviðgjørdur í munninum. Hetta er av tí, at hann áður nýtti ov nógv av rúsdrekka. Nú er seymitráðurin tikin og nýggjar tenn eru á veg. Hann gleðir seg, at yvirraska konuna og dóttrina á konfirmatiónsdegnum við nýggjum tonnum og skraddaraseymaðum klæðningi. Fyri fyrst er hann her, men við nøsini vendari móti einari eitt sindur óruddiligari skrivstovu, meðan tey eru í ferð við at endurnýggja helvtina av Herberginum. Í yvir ellivu ár hevur hann stýrt hesari skútuni.

– Kanska hevur Gud evnað meg til at arbeiða við fólki, sum eru bundin av rúsevnum? Eg havi eina fortreyt at skilja menniskjuni betur enn tey, sum ongantíð hava nýtt rúsevni. Nú havi eg verið uttan rúsevni í 25 ár. Eg misbrúkti evni og alkohol, og eg havi tvær ferðir roynt at gera sjálvmorð. Eg var ein av teimum menniskjunum, sum ikki høvdu tað so gott sálarliga, sigur hann.

**Fekk lítla og onga umsorgan**

Hvussu ber tað til, at ein sjúklingur, sum varð innlagdur 30 ferðir, situr í leiðarastólinum hjá einum rúsumsorganarheimi? Martin byrjar við barnaárunum. Hann vaks upp í einum heimi, har bæði foreldrini nýttu rúsevni. Og hann var vanur at ansa eftir øðrum.

– Mamma mín varð 15 ára gomul, tá eg varð gitin í móðurlívi. Familjurnar skammaðust. Tí stóðu tvey ung einsamøll. Ongin gav teimum umsorgan.

Foreldrini vóru ikki før fyri at taka sær av honum. Heldur ikki tá hann var fyri kynsligum yvirgangi av einum vaksnum manni. Martin varð hvørki sæddur ella hoyrdur, tí legði hann eitt skal rundan um seg. Eitt styttri tíðarskeið var hann á einum barnaheimi. Í barnaárunum kendi hann mest at verða svikin.




Tað kemur fyri, at Martin kennir seg leiddan at fara út at leita eftir fólki á ávísum støðum í Tórshavn.

– Í dag ivist eg ikki í, at mamma og pápi elskaðu meg. Men evnini og umstøðurnar vóru bara ikki til staðar.

Bæði vóru yngri, tá tey doyðu. Hvat varð tá av Martini? Hann fann ugga í alkoholi og narkotika. Tá hann endaði á sjúkrahúsinum, hugsaði hann ofta um sangin hjá Kim Larsen, *Forkledd som voksen*. *Bara tey vistu, hvør eg eri*, hugsaði hann.

**Hildin í hondina**

Á leiðini í sínum fløkta lívi, møtti hann Hertu og fekk fleiri børn saman við henni, til hann skilti, at hann átti at verja familjuna. Tá gekk hann á gøtunum og víðarlundunum í Havn, og inn og út úr rúsviðgerð.

– Til seinast vildu tey ikki síggja meg á viðgerðarstøðunum, tá fekk eg karantenu. Tá sat eg bara úti í býnum og bíðaði til eg fall um. Og eg vaknaði á vøkudeildini á sjúkrahúsinum.

– Har lá eg og tosaði við Gud. Barnatrúnna hevði hann fingið við sær frá ommuni. Men tað varð mest til dyst við Gudi.

– Eg var beiskur inn á Gud, og eg segði: „Um tað er hetta lívið, sum tú hevur givið mær, og eg havi biðið og trúð, so kanst tú fara frá mær“. Men eg hugsaði eisini, at hvussu einsamallur Jesus var, tá hann lá og bað í Getsemane. Og seinni á krossinum, tá hann kendi seg gloymdan av sínum pápa. Soleiðis kendi eg meg eisini. „Hví fórt tú frá mær?“ spurdi eg Gud.

Ikki langa tíð eftir hetta, gekk hann rúsaður í býn-

um. Tá var tað sum um ein rødd kom út gjøgnum eitt handilsvindeyga og segði: „Vildi tað ikki verið synd at biðja túsund bønir og ikki fáa bønarsvar, og so eru tær túsund og ein, sum skulu til?“

– Hetta var ein vekjari fyri meg: „Eg má skunda mær at biðja“, hugsaði Martin.

– Ongin var saman við mær. Sjálvt um øll vóru farin frá mær, so helt Gud fast í hondina hjá mær. Trúgvin bar meg og helt mær uppi.

– Tá eg til seinast varð lagdur inn á eina stongda sálarsjúkudeild, tí at eg enn einaferð hevði tikið ov nógv av rúsevnum, tók eg eina avgerð: „Hvat so enn hendir mær, so vil eg ikki rúsa meg meira“. Hetta kláraði hann. Trongdin eftir rúsinum hvarv heilt. Samstundis gav hann Gudi eitt lyfti: „Um eg nakrantíð komi út úr hesum, so vil eg geva lív mítt at hjálpa øðrum menniskjum.“

**Eitt pínufult tap**

– At vera edrúur er einfalt, sigur hann.

– Men at møta tíðini, sum farin er, og at kenna fylgjurnar av lívinum, sum hann hevði livað, var nógv verri. Fyri Martini var vegurin langur. Hann fekk samband aftur við fyrrverandi unnustuna, Hertu. Tey fluttu til Sandoynna, har hann bleiv fótbóltsvenjari hjá barnaliðnum og kvinnuliðnum. Lønina, hann fekk, nýtti hann at gjalda gamla skuld.

– Har fekk eg nógvan kærleika frá fólkinum. Har kendi eg meg tryggan. Men eg græt nógv og var fyri ongum. Og tó, so kendi eg, at eg varð hjálptur. Gud tók í hond mína og fekk meg aftur á føtur.

Martin hevði fingið meira at stríðast fyri. Dóttirin Jóhanna varð rakt av ringari krabbasjúku. Hann vónaði, at tað fór at ganga væl, men so varð hon knappliga illa til passar.

– Hon doyði í mínum ørmum fyri nýggju árum síðan. Tá vóru bert fimm vikur síðan verfaðirin doyði. Hetta hevur merkt okkum øll, sigur hann stillisliga.

Hann brýtur ermuna upp á jakkanum. „Pápa gentan. Vit síggjast aftur!” stendur tatoverað á arminum.

– Um eg ikki var vísur í, at vit møtast aftur, so haldi eg, at eg hevði givist. Tað er ikki alt, vit skulu skilja. Ein dag fáa vit at síggja samanhangin.

Martin hevur fingið eina fasta vón. Hann peikar á eina aðra tatovering. Har stendur „Frælsi“ við japanskum teknum.

– Eg kenni, at eg eri fríkendur. Frælsur frá at vera bundin.

Í ár 2000 varð hann giftur við unnustuni, sum varð hansara stuðul. Tey hava tað gott saman við teirra seks børnum. Tey hava eisini ein gásaflokk. Hvørt kvøld syngur Martin kvøldbønina saman við sínum børnum.

– Tað er gott at leggja tey í Guds hendur.

– Eg livi nú og eri nøgdur við tað, sum eg havi. Hóast onkur størri kreppa hevur verið, so eri eg ikki vendur aftur til rúsuna og hitt gamla lívið.

**– Virðingina mást tú ongantíð taka frá einum menniskja. Hana mugu vit verja.**

**Martin Kúrberg,**
*leiðari í Herberginum í Tórshavn*

**Saman við lítla Martini**

Tvey ár eftir, at hann ikki varð bundin av rúsevnum, fór Martin til Danmarkar í fýra ára læru at fáa útbúgving at viðgera fólk við rúsevnatrupulleikum. Hetta bleiv eisini ein ferð inneftir. Hann møtti sínum egna uppvøkstri og varð settur andlit til andlits við sálarligar snuddir í barnaárunum. Beint undir einum fyrilestri um smábarna snuddir, sakk hann saman.

– Eg fór heilt í tungt óvit. Eg sá fyri mær smádrongin, tá mamman fór frá honum um kvøldið. Og eg sá fyri mær, hvussu tað var at vera hann. Eg var smádrongurin, sum ikki varð sæddur ella hoyrdur, men fekk ringa viðferð.

Í fleiri ár orkaði hann ikki at hoyra røddina hjá smádronginum, men nýtti alkohol og ymisk evni at doyva skrígginí. Tað var sum um hann leyp aftur í tíð. Tað var pínufult at minna seg á, hvat barnið hevði liðið. Men Martin steðgaði ikki har. Hann fór til barndómsheimið og gekk runt í húsinum. Hann tók lítla Martin í hondina og segði: „Ongin skal nakrantíð fáa gjørt tær nakað ringt longur“. Hann vildi gera meira, og skrivaði nágreiniliga, hvat viðkomandi hevði gjørt ímóti honum. So fór hann til løgregluna og meldaði tann, sum gjørdi yvirgangin.

Sakin var ov gomul, men tað hevði ikki so nógv at siga.

Tí tá Martin var inni hjá løgregluni og varð avhoyrdur, varð sagt við hann: „Vit trúgva tær, og vit halda eyga við hesum manninum“, segði løgreglan.

– At eg fekk sagt tað og tey trúðu mær, gjørdi mær gott. Tann lítli smádrongurin, sum hevði fingið yvirgangin, er komin heim til mín. Framhaldandi kann eg gráta um hann, tá uggi eg hann.



– Eg var ein av flakkandi sálunum, sum høvdu ilt í sálini, sigur Martin Kúrberg. Í 25 ár stríddist hann við rúsinum, áðrenn hann brádliga legði kósina um. At hann sjálvur hevur eina trupla søgu, ger hann betur útgjørdan at skilja onnur. Her sæst hann saman við sosialstjóranum í Frelsunarherinum, Wenche Walderhaug Midjord.

**Ongin skal doyggja á vegnum**

Herbergið hevur ikki so nógv høli, men her búgva 10 fólk. Her er altíð ein eyka madrassa, um so er at onkrum tørvar eina legu. Tá fólk banka á dyrnar um kvøldið, hava tey møguleika at tosa við eitt vaktarfólk. Tey hava møguleika at vaska klæðir og fáa eitt brúsubað. Næsta morgun stendur morgunmaturin klárur. Klokkan tíggju skulu øll út úr hølunum, men tá er hitastovan opin. Tí kunnu fólk vera í húsinum allan dagin.

Í Føroyum er eitt av teimum støðunum í heiminum, har fólk skjótast kunnu gerast heimleys. Her eru viðurskiftini so smá. Um ein persónur hevur mist einar tvær-tríggjar íbúðir, og hevur ein atburð út yvir tað vanliga, so ávara fólk hvør annan at leiga út. Men her seta vit ongi krøv.

Tey hava ein búfelagsskap fyri tey, sum klára seg betur. Meðan tey, sum ikki klára seg so væl, hava møguleika at búgva á Herberginum. Búfólkini skulu hava skil og ordan í hølunum ella tey fáa onnur at hjálpa sær at rudda. Eisini hetta er at hava virðing hvør fyri øðrum.

– Eg vil vera eitt medmenniskja, men eg sigi frá og seti greiðar reglur. Fólk hava virðing fyri mær, sigur Martin.

Hann óttast at bóklig vitan og yrkiskunnleiki eru í ferð við at ráða yvir umsorganararbeiðinum.

– Um hjartað verður kalt, hjálpir hetta ikki í umsorganararbeiðinum.

*– Hvussu ert tú førur fyri at halda hjarta heitt?*

– Eg fari ongantíð at gloyma, hvaðan eg sjálvur komi frá. Mítt ynski er at vera Martin, sum kom út úr misbrúkinum og kann seta meg niður at hjálpa øðrum. Tú eigur altíð at síggja menniskjuna, ikki sjúkuavgerðina ella málið. Rúsmisnýtsla er at rýma frá veruleikanum. Okkara uppgáva er at seta ljós á veruleikan, so at lívið kann livast uttan rúsevni.

**Tú ert meira enn misnýtslan**

Leiðarin lurtar eftir fólkunum – og eisini eftir Gudi. Tað hendir, at hann fær eitt innskot at fara at leita eftir búfolki á einum ávísum stað. Eina vetrarnátt bjargaði hann einum manni, sum hevði lagt seg í kavan at doyggja. Tað svíður í, tá er ikki gott, tá fólk gevast á hendur.

– Av og á tendri eg eitt ljós og biði fyri teimum. Ongin, sum hevur við okkum at gera, skal doyggja einsamallur ella doyggja úti á gongubreytini. Ein góður dagur er, tá øll eru komin heim um kvøldið.

Tey, sum arbeiða á Herberginum, hugsa um heildina. Javnan koyra tey mateskjur út til fátækar familjur. Tá Martin legði til merkis, at teirra brúkarar vórðu sett aftast í røðirnar á sosialskrivstovuni, so syrgdi hann fyri, at sosiunomarnir heldur komu á Herbergið. Øll í húsinum fáa fótarøkt, eitt væl umtókt tilboð. Hvønn morgun er andakt, og fólk eru trúføst at koma.

– Tá onkur sigur, at tey hava ein rústrupulleika, sigi eg: „Tað veit eg, men tú ert nógv meira verd/verdur enn misnýtslan. Lat meg hoyra um tann partin!“

Saman royna tey at verða samd um eitt mál, at hon/hann fær eitt betri lív. Á Herberginum er altíð opið, sjálvt um tað miseydnast hjá onkrum. Hetta ger, at tað er friðarligt í húsinum. Tað er sera sjáldan, at løgreglan verður boðsend.

– Ert tú her um tíggju ár?

Martin smílist: – Um Frelsunarherurin er keddur av mær, so haldi eg fram at hjálpa menniskjum. ■



– Ein góður dagur er, tá øll koma heim um kvøldið, sigur Martin Kúrberg, leiðari á Herberginum hjá Frelsunarherinum í Tórshavn.



– Hetta er ein av okkara mest dýrabaru myndum, sigur Finngerð. Saman við børnunum stóð hon við sjúkraleguna hjá Erhard, seinastu tímarnar hann livdi. Vinstrumegin frá: Lukas, Eva og Hákun. (Mynd: Privat)

– Tað er ein sangur, sum hevur fest seg djúpt í mær, sigur Finngerð Djurhuus Olsen. *„Ljós mítt, tað er sum ein bøn, tú kanst sjá“*, sum blaðstjórin á Krigsropet, Hilde Dagfinrud Valen hevur skrivað, hevði stóran týdning fyri hana og mannin tá hann lá deyðasjúkur.

# Trygdarnet í storminum

**Tá maðurin lá at doyggja, fekk Finngerð Djurhuus Olsen eina óvæntaða uppgávu: At gera eina nýggja sangbók í Føroyum.**

**Tekstur og myndir:** Marit Dehli-Johannesen

Góðir tónar verða spældir á klaverinum í stovuni í Havn. Hetta var ikki fyrstu ferð. Aftur og aftur spældi og sang Finngerð fyri sínum deyðsjúka manni. Í seingini lá hann og lurtaði eftir sanginum, sum Hilde Dagfinrud Valen hevði skrivað og sum Thor Fjellvang hevði lagt lag til:

*Ljós mítt, tað er sum ein bøn, tú kanst sjá,*
*ein teskan, ið røkkur Guds oyra.*
*Tær innastu vónir, ta djúpastu pínu,*
*alt tað, ið mín granni ei sá.*

Sangurin fekk sett navn á tað, sum ikki varð sagt, sviðan um tað, sum skjótt fór at henda. Hetta var ein tung tíð. Fyri fimm árum síðan fekk familjan at vita, at ein 20 cm stórur knútur var í maganum hjá Erhardi. Hetta var ein svullur, sum ikki kundi skerast burtur ella viðgerast. Og nú nærkaðist móti endanum.

– Frá fyrsta degi vóru vit greið yvir, at hann fór at doyggja. Og Erhard var ikki illa sjúkur meira enn nakrar mánaðir. Tað varð nógv ferðing aftur og fram til sjúkrahús í Danmark. At hava børn í øllum hesum var trupult. Vit vistu, at hann fór at fara herfrá, og vit fyrireikaðu okkum, at tað kom ein stormur, sigur Finngerð.

Hon hyggur út gjøgnum tey stóru vindeyguni í Frelsunarherinum í Havn og hugsar um tíðina, sum farin er. Hon sær trøini, sum sveiggja í vindinum og oysregninum. Sum føroyingur er tað natúrligt at heinta myndir frá havinum, tá hon skal greiða frá tí, sum hendi teimum í famljuni.

## Skalka lúkurnar

– Tá ið tú siglir og tú sært, at tað verður ódnarveður, so skalkar tú lúkurnar og bindur alt fast, sum er leyst, so at tú kanst koma heilskapaður gjøgnum stormin. Soleiðis kunnu vit eisini gera í tí andaliga lívinum. Tú veitst, at trúgvin kann gera teg sterkan. Tá fellur tú ikki heilt niður í dýpið. Tú hevur eitt trygdarnet undir tær. Hetta havi eg kent. ➤





Lukas (t.v.) og Hákun gera klárt til jarðarferðina hjá pápanum 10. apríl 2021. Á gravsteininum hjá Erhard stendur eitt ørindi úr sálminum „Tryggur í Jesu ørmun". (Mynd: Privat)

Røddin tagnar og eyguni fyllast við tárum.

Nú eru trý ár síðan maðurin doyði, bara 61 ára gamal. Hesa tíðina hevur hon medvitandi arbeitt við at halda seg saman, og kendi, at hon kundi hvíla í sanginum „Tryggur í Jesu ørmum".

Men samstundis vildi hon vera sterk í tí, sum lá fyri framman. Hon fylti seg sjálvan og heimið við tónleiki, sum gav teimum vón.

Lagið til sangin „Lyset mitt er som en bønn vi kan se", er vakurt. Teksturin í sanginum er nógv sigandi, hann bæði nemur við og lyftir okkum upp. Eina bøn kanst tú ikki síggja, men ljósið sært tú. Sangurin troystaði okkum í sorgini, áðrenn maðurin doyði. Vit vitstu hvønn veg tað bar, sigur hon.

Saman við børnunum Lukasi, Evu og Hákun stóð hon við songina hjá sínum elskaða Erhardi. Tey hildu í hondina á honum til hann fór.

**Ein gáva frá Gudi**

Við jarðarferðina 10. apr. 2021 varð sangurin „Lyset mitt er som en bønn vi kan se" sungin, fyrstu ferð í føroyskari týðing:

**– Frá fyrsta degi vórðu vit greið yvir, at hann fór at doyggja.**

Finngerð Djurhuus Olsen

*Ljós mítt, tað er sum ein bøn, tú kanst sjá,*
*ein longsul í loga væl goymdur:*
*Nem við tey, vit eiga, í hjarta og sinni*
*og fyll teirra innastu trá.*

Eftir stóð Finngerð, 52 ár og við ábyrgdini av tveimum børnum, sum ikki vóru myndug. Elsti sonurin Hákun var í Noregi sum offiserur í Frelsunarherinum í Lillestrøm. Sum einamamma var hon takksom fyri valið, sum hon hevði tikið: At steðga yrkisleiðini at vera roknskaparleiðari í einari størri fyritøku og heldur fáa meira tíð til síni nærmastu. Meðan hon hugsaði um, hvussu hon skuldi loysa alt tað praktiska, fekk hon ein óvæntaðan fyrispurning: „Kundi tú hugsað tær eitt fulltíðarstarv at leggja til rættis eina nýggja sangbók til Frelsunarherin í Føroyum?" Finngerð játtaði at taka við uppgávuni.

– Kanska var hetta ein gáva frá Gudi, at hann gav mær hetta starvið. Hetta hóvaði mær væl, og tó ein trupul avgerð. Seinasta dagin, eg arbeiddi sum roknskaparleiðari, fekk sonurin, sum var 13 ára gamal, diabetis í flokki 1. Soleiðis kann ein gerandisdagur verða broyttur eftir eini lítlari løtu.





– Nógvir sterkir tekstir siga frá trúfesti, styrki og góðvild Harrans móti okkum í bæði stórum og smáum. So tað er ein stórur forrættur at hava møguleika at arbeiða við nýggju sangbókini hjá Frelsunarherinum. At kunna miðsavna seg um tað andaliga mitt í øllum tí trupla, gjørdi mær gott, sigur Finngerð Djurhuus Olsen.

**Steðgaði á**

Fyrstu tíðina sat hon í Frelsunarherinum og arbeiddi. Men so kom alheimsfarsóttin og Finngerð mátti hava arbeiðshøli heima, tí at familjan var í vandabólki.

– Eg arbeiddi eftir umstøðunum og tók frí teir dagar, mær tørvaði at hava frí.

– Av og á mátti eg hava fríløtur. Men tá eg tók tilfarið fram aftur, var eg før fyri at síggja alt meira greidligt.

Á skrivstovuni heima í gongini arbeiddi hon bæði við gomlum og nýggjum tilfari. Teir trúarfyltu tekstirnir gjørdu nakað við hana.

– Tað slítur bæði sálarliga og andaliga at viðgera ein sang. Tað kann eisini vera tungt at arbeiða einsamallur. Við hvørt kundi eg hugsað mær, at eg ikki skuldi havt sagt ja til hesa uppgávuna, tí at tøl eru lættari at leggja frá sær enn tekstir.

**Hevur tú upplivað, at sangir kunnu ugga teg?**

– Ja, tað er ein orsøk, at vit syngja, tá vit koma saman. Tað eru nógvir rámandi tekstir, sum siga frá trúfesti, styrki og Harrans góðvild mót okkum bæði í stórum og smáum. Tað er ein framíhjárættur at fáa møguleika at arbeiða við eini sangbók. At leggja dent á andalig evni, í øllum sum er trupult, tað ger gott.

*– Tónleikur ríkar tað andaliga lívið. Sosiali felagsskapurin hevur eisini stóran týdning, heldur Finngerð Djurhuus Olsen (høgrumegin), her saman við Astrid Hansen (í miðjuni) og Marit Skartveit. Finngerð var leiðari í hornorkestrinum hjá Frelsunarherinum í Tórshavn í fleiri ár.*



**Gud í storminum**

Arbeiðið við sangbókini er um at vera liðugt. Finngerð hevur havt fleiri fólk, sum hava arbeitt saman við henni. Hin føroyski listamaðurin og sangyrkjarin Martin Joensen hevur umsett sangin „Lyset mitt er som en bønn vi kan se“ og fleiri aðrar sangir. Eitt toymi hevur hjálpt henni at velja hvørjir sangir vera við í sangbókini. Finngerð dámar væl at vera burtur í lýrikkinum.

– Tað eru nógvir sangir, sum tala nógv til mín. Fleiri av yrkjarunum eru vegleiddir av Gudi at yrkja sangir. Hetta eru ikki bert orð, sum eru sett á eitt pappír. Eg kann merkja, at hetta eru tekstir, sum eru til signingar fyri mong menniskju.

Hon hevur brúkt nógva tíð at leita. Sangbókin skal fevna um lívsins stóru og smáu evni. Men hvussu er at finna tekstir, um sorg í samband við stórskaða, um pínu sum ikki er um deyða, um duldar sorgir og um einsemi? Saman við toyminum fann hon sangir, sum eisini fevna um vanlukkur.

**Megin í náttúruni**

– Í Føroyum hava vit havt fleiri náttúruvanlukkur. Vit liva so nær náttúruni, og bátar eru gingnir burtur. Kanska er tað tí, at trúgvin er fest so djúpt í fólkinum her. Í mun til aðrastaðni, so liva vit í smærri umstøðum: Fer onkur av vanlukku, so eru altíð nøkur sum kenna viðkomandi. Serstakliga í teimum eldru sangunum eru treystar myndir um Gud sum ein klettur. Ein sum vit kunnu hvíla hjá og ein sum fevnir okkum.

– Hevur tú roynt tað?

– Ja, bæði í truplum tíðum og gjøgnum alt lívið, havi eg kent hansara trygd. Gud hevur verið góður í góðum døgum, men hví skuldi hann ikki eisini verið góður, tá stormarnir koma? ■

# *Ein bøn tú kanst sjá*

*Tekstur: Hilde Dagfinrud Valen*
*Lag: Thor Fjellvang*
*Týtt til føroyskt: Martin Joensen*

*Ljós mítt, tað er sum ein bøn, tú kanst sjá,*
*ein longsil í loga væl goymdur:*
*Nem við tey, vit eiga, í hjarta og sinni*
*og fyll teirra innastu trá.*

*Ljós mítt, tað er sum ein bøn, tú kanst sjá,*
*ein glóð framman fyri Guds ásjón.*
*Vit koma við eyðmýkd, vit koma við vónum,*
*til tín, sum hekk krossinum á.*

*Ljós mítt, tað er sum ein bøn, tú kanst sjá,*
*ein teskan, ið røkkur Guds oyra.*
*Tær innastu vónir, ta djúpastu pínu,*
*alt tað, ið mín granni ei sá.*

*Ljós mítt, tað er sum ein bøn, tú kanst sjá,*
*tó veikt mangan login man brenna:*
*Tað birtist hjá tær, sum er ljósið í heimi,*
*hjá tær, sum í krubbuni lá.*

*Ljós mítt, tað er sum ein bøn, tú kanst sjá,*
*ein longsil, ið røkkur Guds hjarta:*
*Vælsignað og varðveit mítt ljós nær hjá tær, Gud,*
*til eg fari foldini frá.*

*Sangbók Frelsunarhersins*






Sjómansheimið í Fuglafirði.




Á veg á sunnudagsskúlaútferð í 1958/1959.

# Ein 100 ára gamal, sum ikki slítist

Tann, sum heldur hátíðardag, marsjerar ofta úti og verður góðkendur av øllum. Hvønn tosa vit um? Frelsunarherin í Føroyum. Nú fyllir hann 100 ár.

**Tekstur:** Marit Dehli-Johannesen
**Myndir:** Savnað hevur Inger Hansen, útgivið á Bókadeild Føroya Lærarafelags

Tann 23. oktobur í ár fara korpsini hjá Frelsunarherinum í Vági og í Havn at sláa á stórtrummurnar. Í eina heila viku skal hátíðarhaldið fagnast, at Frelsunarherurin „setti eld í“ fyri hundrað árum síðan. Soleiðis sum vit kenna Herin, so skal horntónleikurin hoyrast úti á vegunum. Tey fara at marsjera og at halda útimøtir. Tey fáa vitjan av fólki í Frelsunarherunum úr øðrum londum. Fólk í Føroyum eru von at síggja, at fólk í Frelsunarherinum marsjera og spæla tónleik. Øll kenna Frelsunarherin og syngja við, tá spælt verður *Jesus læt upp perluportrið*.

Frelsunarherurin í Føroyum er ikki tann sami sum í fleiri øðrum londum, heldur Astrid Hansen, sum er økisleiðari og korpsleiðari í Havn.

Hann er veruleikakendur og er nær at fólkinum. Nógv hava góð viðurskifti við Frelsunarherin. Eisini tey, sum ikki koma í nakra kirkju ella hava samband við trúgv.

Astrid Hansen, sum er úr Noregi, hevur arbeitt tvey tíðarskeið í Føroyum. Hon hevur lagt til merkis, at føroyingar hava virðing fyri Frelsunarherinum.

Hon heldur, at tað er tí, at tey, sum ynskja at verða soldátar í Frelsunarherinum, verða vígd. Tey eru errin av at hoyra til Frelsunarherin og at bera eyðkennisbúna.

Systkinabørnini Edna Kjærbo Kallevik og Berit Kjærbo Kristiansen nikka játtandi. Tær kenna til frágreiðingina. Tær eru báðar uppvaksnar í Frelsunarherinum í Havn í 1950-unum og 1960-unum.

– Har var gleði, einfaldur og góður boðskapur og øll vóru vælkomin. Horntónleikurin kom tíðliga. Útimøtir vóru tvær ferðir um vikuna og vóru kend í býarmyndini tá, siga tær.



**– Í Frelsunarherinum í Tórshavn fingu vit møguleika at blóma, hava rúm og taka lut, líka frá tí vit vóru lítil.**

Berit Kjærbo Kristiansen, majorur

Majorurin Berit Kjærbo Kristiansen sigur, – at hon ongantíð var í iva um, at tað var her, hon skuldi vera.

– Vit livdu í korpsinum. Har var góður felagsskapur og lagt til rættis til allar aldrar. Tað varð heitt á okkum at taka lut við sangi og vitnisburði. Vit fingu góða læru og korpsið var mítt annað heim.

**Frálíkt tilfar**

Frelsunarherurin hevur havt haldgóða ávirkan í føroyska samfelagnum. Hetta fáa vit at vita í tveimum søgubókum, sum vórðu givnar út til 90-ára hátíðarhaldið.

– At geva bøkurnar út, var mítt hugskot, tí vit høvdu so nógv tilfar liggjandi. Øll vildu vera við í útgávuni,



Dreingjaskótar á legu í Kvívík undir 2. heimsbardaga.



Vitjan í Suðuroy í 1934. Hornorkestrið í báti.

◀ sigur Inger Hansen (86), soldátur í Frelsunarherinum í Havn.

Hon hevur í nógv ár savnað tilfar og hevur havt fleiri myndaframsýningar um Frelsunarherin. Inger arbeiddi í fleiri ár í einum myndahandli og hevði altíð myndatólið við sær. Um 400 av myndunum, sum hon hevur tikið, eru við í søgubókunum.

Tað var eitt sindur trupult at byrja arbeiðið, men so fekk majorurin Njál Mackay Djurhuus (1941-2024) til uppgávu at skriva søguna. Hann fór við eldhuga at taka sær av arbeiðinum og fekk góða hjálp frá fleiri. Njál fekk tilfar úr Danmark, Onglandi, Reykjavík, Oslo og úr Havn. Tá tað gamla korpshøli í Havn skuldi rívast niður, komu tey fram á kassar við ymiskum søguligum tilfari, sum gav honum góða hjálp í arbeiðinum.



Sunnudagsskúla-útferð í Vági.

**„Óstýriligar oyggjar“**

Longu í 1922 komu tveir offiserar á vitjan í Havn og hildu møtir. Væl av fólki komu til møtini og tey tóku væl ímóti teimum. Dimmalætting skrivaði tá um vitjanina: „Frelsens hær udfører som bekendt et meget stort og opofrende Arbeide for de daarligst stillede i Samfundet, og fortjener alles Paaskønnelse og Sympati.“

Tvey ár seinni varð eldurin tendraður. Tann 23. oktobur 1924 varð byrjað at halda møtir. Teir fyrstu leiðararnir vórðu Rasmine og Andreas Juul-Pedersen. Eftir at tey høvdu fingið savnað pening keyptu tey kaffistovuna hjá Reinert og gjørdu hana um til høli at halda møtir í. Frá byrjanini og til 1927 var føroyski Frelsunarherurin undir leiðslu úr Danmark. Síðan undir enskari leiðslu til 1934.

– Eitt av hæddarpunktunum hjá norskum lesarum er óiva, tá kommandørurin Karl Larsson í 1934 fór til Íslands og til Føroyar. Og eftir ferðina boðaði frá til alheims høvuðsstøðina, at Noregi ynskti at taka ábyrgdina av Frelsunarherinum í Føroyum og í Íslandi, leggur Njál Djurhuus dent á.

Per Arne Krumsvik, sum er leiðari í stýrinum í søguliga felagnum hjá Frelsunarherinum, hevur eina aðra frágreiðing: Soleiðis, sum eg havi skilt tað, sigur hann, so var tað trupult hjá eingilsmonnum at leiða hesar „Óstýriligu oyggjarnar“. Eg hómi eisini um hetta ikki hevur søguligan týdning, tí at bæði føroyingar, íslendarar og norðmenn hava felags røtur, teir vóru allir víkingar.



Hornorkestrið vitjar í Kollafirði undir krígnum. Fólk komu í hópatali, tá Frelsunarherurin hevði útimøtir á ymsu oyggjunum.

**Ein partur av samleikanum**

Per Arne Krumsvik er verkætlanarleiðari at savna inn søguligt tilfar í Noregi, Íslandi og í Føroyum. Í fjør vitjaði hann í Vági og í Havn og skipaði eitt savnað tilfar, sum er um 20 hillametrar og læt tað til Tjóðskjalasavnið í Føroyum.

– Vit ynskja at savna tað, sum vit hava av søguligum tilfari og at tað verður varðveitt í tryggum umstøðum. Í Føroyum hava vit havt sum siðvenju at hava okkara egnu søgubøkur í korpsunum. Har hava vit skrivað tað, sum er av størri týdningi í árinum, sum t.d. at ein generalur hevur verið á vitjan, at soldátar eru vígdir, at vindeygu eru skift og tá vit hava fingið størri gávur. Øll árini hava hvør sína síðu.

*– Er nakað sum sermerkir Frelsunarherin í Føroyum í mun til arbeiðið í øðrum londum?*

– Jú, eg havi lagt til merkis, at Frelsunarherurin í stóran mun er ein partur av føroyska samleikanum. Hetta er meira enn í øðrum londum. Tá eg kom til Tjóðskjalasavnið og segði hvørji ørindi eg hevði, játtaði starvfólki og segði: „Ja, Frelsunarherin kenna vit væl. Og Njál Djurhuus hava vit havt nógv samskifti við“.

Økisleiðarin Astrid Hansen sær, hvussu fólk verða drigin til Frelsunarherin.

– Nøkur fólk, sum kanska hava gingið í sunnudagsskúla, ynskja, at Frelsunarherurin tekur sær av jarðarferðini. Hetta sigur, at her er nakað, sum hevur verið sera gott fyri tey. Tí í Frelsunarherin koma fólk úr øllum kirkjum og samkomum. Og okkara týdningarmesta uppgáva er at náa tey, sum ongin annar kann. Herurin hevur eitt gott orð á sær og hevur gjørt nógv fyri ta felagskirkjuliga arbeiðið. Tað týdningarmesta er, at tú verður frelstur og fær góð viðurskifti við Gud, leggur majorurin Astrid Hansen dent á.

Per Arne Krumsvig vísir tó á, at hann hevur funnið tilfar um ósemjur og at tað áður hava verið innanhýsis ósemjur. Njál Djurhuus hevur róst teimum, sum undan honum vóru, hvussu tey handfóru eym evni. „Jeg ser, hvordan datidens salvasjonister løste problemer på en fin måte. Vi bør vise respekt for de gamle, som la et godt grunnlag å bygge videre på“, segði hann við norska blaðið Krigsropet.



**– Tað sum undrar meg er, at Frelsunarherurin í stóran mun er partur av tí tjóðskaparliga føroyska samleikanum. Nógv meira enn í øðrum londum.**

**Per Arne Krumsvik,**

*leiðari fyri søguliga felagið hjá Frelsunarherinum.*

**Setir dám á tjóðardagin**

Majorurin Berit Kjærbo Kristiansen er ikki í iva, at Herurin hevur eina positiva ávirkan.

– Frelsunarherurin hevur boðað ein greiðan boðskap og samstundis einfaldan og væl etandi. Njál Djurhuus hevur greitt frá, hvussu Herurin ber seg at: „Vit eru ikki so stirvin, tað kennist á okkum, tá vit halda møtir og hvussu vit bera okkum at í Føroyum. Tey, sum arbeiða í Frelsunarherinum í Føroyum, eru ógvuliga bráð og tó ansa tey eftir teimum eyðkennum, sum Herurin hevur, og tað ætla vit at halda áfram við.“

Í Føroyum eru 18 oyggjar og tær eru um 600 km vestan fyri Bergen. Eftir 1948 eru oyggjarnar ein sjálvstýrandi partur í danska kongaríkinum og hava egið løgting og landsstýri. Í Føroyum verður arbeitt innan ▶



Edna saman við offisersforeldrunum Hedvig og Hilmar Andrésen.

fiskivinnu, alivinnu, ferðavinnu, landbúnað og innan fleiri aðrar vinnugreinar.

Í Føroyum búgva í dag um 54.900 fólk. Á tjóðardegnum 29. juli, á ólavsøku, eru nógv fólk í Havn. Og í øllum hátíðarhaldinum marsjerar Frelsunarherurin við horntónleiki oman á Vaglið at halda útimøti. Og nógv fólk lurta eftir teimum. Astrid Hansen sær hvussu stóran týdning hetta hevur. Um Frelsunarherurin ikki var við í ólavsøkuhaldinum, so restaði nakað í. Ein kendur skemtisangur sigur soleiðis: „Sig mær hvat ein ólavsøka er, uttan bum bummelum frá Frelsenser?" Tað er heilt ótrúligt, at ungar kvinnur kunnu standa uttandura og siga: „Eg eri við í Frelsunarherinum og Jesus hevur frelst meg".

**Ein lítil veking**

Eisini har úti á havinum verður eitt 100-ára hátíðarhald. Í Suðuroynni, sum er sunnasta oyggin í Føroyum, hevur Frelsunarherurin verið síðan 1947. Fólk úr Havn høvdu verið og hildið møtir og sunnudagsskúla í fleiri ár. Men tvey ár eftir kríggið keyptu tey eini hús og byrjaðu arbeiðið.

Sersjantarnir Henrietta og Sámal Midjord leiða í dag eitt korps við 25 aktivum soldátum og øðrum. Tey kenna framvegis til ávirkanina, sum undangongufólkini gjørdu. Tí at Frelsunarherurin hevur gjørt eitt gott arbeiði í oynni.

Ein eldri kvinna í korpsinum minnist væl, hvussu soldátar úr Havn komu til bygdina við gittara og harmoniku og lívgaðu upp við barnamøtum, sunnudagsskúla og ungdómsarbeiði. Hetta bleiv teirra eyðkenni í Vági.

Nøkur ár seinni, í 1960-unum, tá hendi hetta aftur.

– Í byrjanini av 60-unum var eg sum lítil genta og vitjaði korpsið í Vági. Tá minnist eg, at fleiri yngri soldátar vóru. Tá Elseba Thomsen úr Vági varð offiserur, og í 1970-unum varð starvsett í heimbygdini, var veking í korpsinum, sigur Berit Kjærbo Kristiansen.

Tá blómaði barna- og ungdómsarbeiðið. Sámal Midjord sær fruktirnar.

– Vit eru so heppin, at vit hava aktivar soldátar, sum komu við í Frelsunarherin tá. Tey siga, at tað vórðu fleiri, sum løgdust afturat tá. Tey vístu eisini video, sum tá varð sera væl dámt. Í dag síggja vit týdningin av at hava arbeiði millum børn, ung og familjur. Tað eldra ættarliðið kennir okkum og veit hvør Frelsunarherurin er.

– Tað slóðbrótandi arbeiði heldur fram. Kanska gera vit okkara arbeiði eitt sindur øðrvísi enn aðrar samkomur? Fólk skulu kenna seg vælkomin.

– Ofta verða hølini leigaði út til vælgerandi endamál. Sum tá ið kommunan kennir, at fleiri ikki eru so væl fyri fíggjarliga, og saman við Frelsunarherinum bjóðar inn til døgurða. Síðstu ferð sótu um 150 við døgurðaborðið í møtisalinum.

– Arbeiðið millum mannfólk Orðið á borðið er vaksið nógv. Hvønn týsmorgun eru savnaðir um 45-50 menn til morgunmat og sang.

– Hetta skapar nakað í allari oynni. Eg vil nevna hetta eina lítla veking! Tað eru ikki bert menninir, sum fáa lut í hesum. Eftir morgunmatin og sangin koma teir heim aftur til sínar familjur og siga frá, hvussu gott teir hava havt tað. Tað er nakað serstakt at uppliva, tá hesir menninir syngja saman, sum koma úr ymiskum kirkjum og samkomum. Tað besta er, at tað eisini er ein lítil vøkstur í samkomuni. Orðið á borðið ger hetta einfaldari at koma á møti.

Henrietta og Sámal Midjord leggja doyðin á at arbeiða í sunnudagsskúlanum, sum savnar um 25 børn. Eisini Heimaforbundið, sum er eitt arbeiði fyri kvinnur, er væl kent í bygdini.

– Verður Frelsunarherurin her um hundrað ár?

Sámal ivast ikki. – Vit skulu altíð vera viðkomandi í tíðini, sum vit liva í. Tað er stórur tørvur á okkum, um vit framhaldandi halda fast við loysnarorðið hjá okkum: „Hjarta hjá Gudi og hondina út til menniskju", so eri eg avgjørt vónríkur, at Frelsunarherurin hevur eina framtíð í Føroyum.

**Umsorgan fyri teimum, sum eru bundin av rúsevnum**

Per Arne Krumsvig heldur, at Frelsunarherurin er ikki væl lýstur, tá skrivað verður ymiskar yrkisgreinar. Hann vil tí ansa eftir, at tað ber til at koma til keldur og skjalasøvn, tá søgufólk ynskja at granska arbeiðið. Tá vilja vit vísa fram bæði tær góðu og tær minni góðu síðurnar, sigur hann.

Sum ein sosial rørsla hevur Frelsunarherurin verið við til at vera ein berandi bjálki í vælferðarsamfelagnum. Soleiðis er eisini í Føroyum. Í nøkur ár høvdu tey eitt gestaheim fyri sjófólk í Fuglafirði.

– Vit hava altíð hjálpt fólki, tað liggur í okkara DNA. Eitt av teimum er jólahjálpin.

Tórshavnar kommuna spurdi einaferð, um Frelsunarherurin kundi byrja við einum heimi fyri eldri fólk, einum barnaheimi og einum barnagarði. Men so varð ikki. Men fyri 26 árum síðan byrjaði Frelsunarherurin eitt sosialt arbeiði, sum var ein trupulleiki.

– Tey settu hol á eitt eymt evni í samfelagnum, misnýtsluna av rúsevnum. Øll vita, at tað eru fólk, sum nýta rúsevni, men ikki hevur verið gjørt so nógv við tað. Nýtir tú rúsevni, so eru fá av hesum, sum búgva úti á bygd. Tey flestu enda í Havn, sigur Astrid Hansen.





Páskastevna í Havn. Horntónleikurin hjá Frelsunarherinum hevur mangan rungað í Havnargøtum.



**„Øll í Føroyum kenna Frelsunarherin", verður sagt. – Tað er tí at Frelsunarherurin er sera sjónligur í samfelagnum.**

**Astrid Hansen,**
*distriktsoffiserur og korpsleiðari í Tórshavn*

Í 1998 byrjaðu tey eitt Herbergi í grannahúsunum hjá Frelsunarherinum. Hvørja nátt vóru fleiri, sum syrgdu fyri, at tey heimleysu fingu eina song at sova í. Fleiri av teimum, sum vórðu bundin av rúsevnum, komu til møtini og blivu frelst. Nú fingu tey góða hjálp frá tí eldhugaða Niels Edvard Olsen, sum var byrjaður við hesum arbeiðinum. Seinni varð keyptur ein annar bygningur við væl betri møguleikum. Herbergið og hitastovan fingu størri og betri hølir.

– Hetta hevur gjørt, at tað almenna hevur fingið eyguni upp fyri, at Frelsunarherurin hevur tikið móti fólki og gjørt eitt arbeiði, heldur Astrid Hansen.

Eisini reka tey Frælsi, sum er ein viðgerðarstovnur til ung við rústrupulleikum. Á Frælsi sleppa tey ikki teimum ungu, tá viðgerðin er liðug á stovninum. Men hava samband við tey.

**Eitt stað at blóma**

Systkinabørnini Edna Kjærbo Kallevig og Berit Kjærbo Kristiansen minnast eitt samfelag har hurðarnar ikki vórðu læstar og fá lógarbrot og næstan ongi rúsevni. Tá Hilmar Andrésen, sum er pápi Ednu, var á vitjan í fangahúsinum, læt ein av teimum innsettu hurðina upp, tí at fangavaktin var úti og át.

– Hann hevði ikki loyvi at lata nakran sleppa inn, men tá tað var ein úr Frelsunarherinum, so gjørdi hann tað, sigur Edna.

Omman og abbin hjá teimum báðum vórðu bæði frelst í Frelsunarherinum.

Áðrenn plagdi abbi teirra, Adolf, at fara saman við øðrum hvønn fríggjadag at drekka pilsnarøl og at spæla kort. Tá keypti hann sjokulátu til børnini, tí hann hevði ikki so góða samvitsku. Pápasystir teirra, segði, at tá pápi hennara bleiv frelstur, helt hann uppat at drekka og at spæla kort, men tá helt hann eisini uppat at keypa sjokulátu, smílist Berit.

Í 1928 varð pápi hennara føddur. Hann varð uppkallaður eftir soninum hjá William Booth, og nevndur Bramwell.

Hetta var óiva tí, at foreldrini vóru so glað fyri Frelsunarherin. Hann bar navnið væl og bleiv seinni soldátur í Frelsunarherinum. Øll vóru vælkomin í okkara heimi. Eg lærdi at hava virðing fyri øðrum. Hetta er nakað, sum hevur fylgt mær alla mína tíð, sigur Berit, sum hevur norska mammu og føroyskan pápa.

Bæði mamma og pápi Ednu vórðu majorar í Íslandi og í Føroyum. Men pápin doyði bert 46 ára gamal.

Undir øðrum heimsbardaga var pápi mín leiðari í Havn. Hann byrjaði sunnudagsskúla í fleiri bygdum. Tá eg í dag møti eldri fólki úti á bygd, tá glógvar í eygunum, tá tey fáa at vita, at eg eri dóttir Hilmar. Tað hevði stóran týdning, at onkur ferðaðist runt við báti og byrjaði at halda sunnudagsskúla. Fleiri eiga enn sangbøkur, sum navnið er skrivað í við gulli, premia frá sunnudagsskúlanum. Eg møtti einum manni, sum hevði hana í bringulummanum. „At eg varð frelstur hevur gjørt, at øll ættarliðini eftir mær eru frelst", segði hann mær. Hetta er so rørandi at hoyra, sigur Edna.

Kríggið gjørdi at oyggjarnar vórðu meira og minni avbyrgdar. Men tær vórðu vardar av eingilsmonnum.

– So skjótt kríggið var liðugt, sendu føroyskir skótar bundnar hosur til skótar í 3. korpsi í Oslo. Teir vistu, at tað vóru truplar tíðir í Noregi. Í hosurnar løgdu teir brøv. Hetta gjørdi at mamma mín fór til Føroyar, sigur Berit.

Sjálvandi verða tær báðar, systkinabørnini, við í 100- ára hátíðarhaldinum.

– Vit vilja æra okkara forfedrar, sigur Edna.

Bæði hon og Berit valdu at verða offiserar. Edna og maðurin Arne Kallevik vóru offiserar í Noregi í 12 ár og korpsleiðarar í Havn seinast í 1970-unum. Og Edna gav út fyrsta kristna kasettubandið í Føroyum. Berit, sum hevur arbeitt ymsastaðni í Noregi, hevur eisini arbeitt í Vági.

– Eg fekk so nógvar góðar fyrimyndir hjá teimum fólkunum, sum vóru í Frelsunarherinum. Her fekk eg møguleika at blóma, at vera við heilt frá tí, at vit vóru smá. Eg vil æra tey og takka teimum fyri góð barnaár. ■



**BØN UM FRELSU**

Jesus, tú sum sigur, at øll eru vælkomin til tín, her komi eg.

Eg veit, at tú gav títt lív, sum loysigjald fyri syndir menniskjans og eg trúgvi, at tað var eisini fyri meg, tú doyði.
Eg biði um fyrigeving fyri alt tað skeiva, ið eg havi gjørt.

Eg veit, at tú kom at opna vegin fyri mær, heilt inn til nærveru Guds.

Eg treingi til tín.

Takk fyri, at tú elskar meg treytaleyst.

Takk fyri, at tú nú kemur inn í mítt lív og hjálpir mær at trúgva og at liva.

Takk fyri, at tú frelsir meg og gevur mær tína signing.

Takk Jesus!

Amen!

# Føroyar syngja!

Til 100-ára hátíðarhaldið hjá Frelsunarherinum í Føroyum fáa tey eina heilt nýggja sangbók. Tær gomlu sangbøkurnar eru frá 1959 og eru ikki bara ótíðarhóskandi, men eru so nógv brúktar bæði í samkomunum í Havn og í Vági, at tær eru so nógv slitnar.

**Tekstur:** Marit Dehli-Johannesen
**Myndir:** Inger Hansen hevur savnað, og Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út

Er tað nakað, sum fólk í Føroyum kunnu, so er tað at syngja. Føroyingar syngja bæði fosturlandssangir og sálmar. Í Útvarpinum verður ofta spældur fólkatónleikur, og í veitslulag verður sungið væl við. Tá fólk eru savnaði til ólavsøku í Havn, sjálvan tjóðardagin, er vanligt at Frelsunarherurin fer oman á Vaglið og nógv fólk lurta og syngja við „Jesus læt upp perluportrið“.

Frelsunarherurin í Føroyum er væl kendur fyri góðan sang og tónleik. Hvørja ferð samkomurnar koma saman, so verður sungið. Tað eru heilar familjur, sum eru við í horntónleikinum.

Ofta fara tey út at vitna og syngja. Sangirnir eru nógvir, men hvussu skulu vit varðveita teir?

– Vit mugu hava eina nýggja sangbók, segði leiðslan.

Men hvør skal kunna skipa fyri arbeiðinum?

Finngerð Djurhuus Olsen, sum er soldátur í Frelsunarherinum Havn, varð spurd og tók við uppgávuni.




Í nýggju sangbókini hjá Frelsunarherinum eru bæði nýggir og gamlir sangir á føroyskum, sum geva gleði í hjartað.

### Sum at vera detektivur

Hon hevur arbeitt við sangbókini í nøkur ár. Um 600 sangir koma í nýggju sangbókina. Fyri hana sjálva hevur hetta verið ein avbjóðandi tíð. Nakrar mánaðir, eftir at hon hevði sagt ja at arbeiða við sangbókini, bleiv maður hennara sjúkur og doyði av krabbasjúku. Og eftir sat Finngerð við ábyrgdini av tveimum børnum, sum ikki vórðu komin til lógaldurs. Men hon hevur kent, at Gud hevur borið hana gjøgnum hesa truplu tíðina.

– Serstakliga í teimum gomlu sangunum eru sterkar myndir, sum siga frá um Harran sum kletturin. Har kunnu vit finna hvílu og Harrin hevur armar, sum kunnu halda um okkum. Hetta havi eg roynt, sigur hon.

Hon var ikki einsamøll við arbeiðinum, men hon fekk góða hjálp frá eini nevnd við umboðum frá báðum samkomunum í Føroyum. Saman gjørdu tey eina arbeiðsnevnd.

– Nógvir av teimum gomlu sangunum vóru mest sum gloymdir, men vit løgdu ▸

til merkis, at teir vóru góðir og verdir at varðveita.

– Vit tosaðu við fólkini í Frelsunarherinum og spurdu og tey fingu høvi at koma við uppskotum til nýggjar sangir.

Eitt av stóra arbeiðinum var at finna tekstir, nótar og at skriva inn á eitt nótaprogram.

Tey løgdu til merkis, at summir sangir hava fleiri enn eina umseting. Tí var ikki altíð so einfalt at velja hvør umseting, sum skuldi vera við.

– Tað er næstan sum at vera detektivur. Nógvir tímar við telduna, leita á netinum og at tosa við fólk, sum eg ikki kendi, sigur Finngerð.

**Aftur á slóðina**

At fáa eina nýggja sangbók hevur tikið langa tíð. Tá Frelsunarherurin í Noregi fekk eina nýggja sangbók í 1970-unum, tá ynsktu føroyingar eisini at fáa eina nýggja sangbók. Men tíðin fór. Í 2018 var lagt so til rættis, at ein føroyingur kundi setast at arbeiða við eini nýggjari sangbók.

*– Hví er so týdningarmikið at fáa eina nýggja sangbók?*

– Sangirnir siga hvør gudfrøði okkara er. Tað er av stórum týdningi, at vit hava eitt gott og burðardygt úrval av sangum. Tað er so skjótt, at teir kunnu hvørva, um teir bert verða vístir upp á veggin við einum myndatóli á einum møti. Í eini sangbók kunnu vit varðveita sangarvin.

Umsettir eru um 50 sangir. Í bókini eru um helvtin av sangunum, sum eisini verða nýttir av Frelsunarherinum í Noregi. Finngerð hevur fingið góða hjálp frá listamanninum og sálmayrkjaranum Martini Joensen. Saman funnu tey fram til, hvussu norska myndatalan í sangunum kundi umsetast til føroyskt, so at føroyingar skilja, hvat sangirnir hava at siga.

Um vit skriva um seyð, fjøll og um lívið á havinum, so vita tey flestu um hesi viðurskiftini. Tá vit tosa á føroyskum ella á norskum, so er málburðurin nokk so líkur, men tó ikki altíð.

Sangbókin skal hava evangeliskar sangir og eyðkendar sangir hjá Frelsunarherinum. Gudfrøðin skal eisini verða við. Tá ongin herskylda er í Føroyum, kann tann hermálsligi málburðurin vera eitt sindur ókendur fyri føroyingar. Men stórherasangirnir skulu eisini vera við.

Endamálið er at fáa eina góða sangbók. Eina sangbók sum líkist teimum norsku við nótum og talseting. Soleiðis kunnu øll seta seg niður við einum gittara ella við eitt klaver og læra seg at spæla lagið.

Í siðvenjuni hjá Frelsunarherinum hevur sangur og tónleikur eitt stórt pláss – serliga á gudstænastum og útimøtum.







– Sangirnir siga hvør gudfrøði okkara er. Tað er av stórum týdningi, at vit hava eitt gott og burðardygt úrval av sangum, sier Finngerð Djurhuus Olsen, sum hevur staðið fyri stóra arbeiðinum at gera nýggju, føroysku sangbók Frelsunarhersins.

**Ein serstøk mentan**

Kanska er tað tónleikurin, sum ger, at Finngerð er í Frelsunarherinum. Sum tíggju ára gomul fór hon við einum vini til horntónleikin. Hon ynskti at spæla kornett.

– Eg kendi, at her var gott at vera, eitt friðskjól. Í Frelsunarherinum er ógvuliga einfalt soleiðis at skilja, at ynskir tú at gera eitt ella annað, so kanst tú verða brúkt. Tað kristna er ein góður grundvøllur at byggja lívið á.

Felagsskapurin í Frelsunarherinum í Havn er sera góður. Heilar familjur eru við í arbeiðinum og fólk í øllum aldri eru við á møtunum.

– Hetta er sera positivt. Tá eg byrjaði her, vóru bert eldri fólk á møtunum. Tá gjørdu vit av, at vit, sum tá vóru ung, ikki skuldu missa nakað ættarlið. Um tað er soleiðis, at annað av foreldrunum má verða heima at ansa børnum, so hevur tú skorið arbeiðsmegina sundur í helvt. Vit vildu tí gera pláss til børnini, tey skuldu kunna vera við til øll møtini, sigur Finngerð, sum var leiðari fyri tónleikinum í nógv ár.

Í horntónleikinum sita 12 ára gomul saman við 70 ára gomlum. Tann 54 ára gamla er framvegis við og er før fyri at bjóða fram ymisk ljóðføri, alt eftir hvat teimum tørva.

– Eg ynski at geva gleði, sum øll kunnu fáa lut í. Um tú ert yrkisligur ella ikki, so er tónleikur førur fyri at ríka okkara andaliga lív. Hetta er so einfalt, tú hevur sangirnar við tær. Knappliga kemur ein regla til tín, ein sangur. Tøl kanst tú verða liðugur við, men ein sangur kann syngja í tínum høvdi, í tínum heila, langt eftir at tú hevur sungið hann.

Henni dámar væl eldri føroyskar sálmar, við tittli sum vekir hugflog og kenslur: *Eg skar mítt navn í grein ta hvítu* og jólasangin *Kvirra um fjøll og fløtur*. Tað ljóðar so yndisligt og vakurt, tá Finngerð sigur sálmarnar á føroyskum.

– Eg dugi teir flestu sangirnar uttanat. Tað hevur verið serligt at arbeiða við sangbókini, tí at orðini í sangunum hava tað við sær, at tey seta seg føst í heilanum. Tað er ikki so lætt bara at blaða til tann næsta sangin. Fleiri hava spurt meg, um tað er „eitt starv“ at geva út eina sangbók. Og ja, tað er tað, staðfestir Finngerð.

– Tað er eitt væl størri arbeiði, enn vit geva okkum far um. Hetta er ikki sum at gera eitt sanghefti til eitt silvurbrúdleyp. Men vit koma á mál, tá Frelsunarherurin hevur 100-ára hátíðarhald 23. oktobur. Tá eg standi við eini lidnari bók í hondini, tá verði eg glað og stolt vegna Frelsunarherin, at vit hava fingið gjørt eina nýggja sangbók. ■

# Undangongumaðurin hjá teimum heimleysu

Við majorinum Njál Mackay Djurhuus er ein kendur, sermerktur og avhildin offiserur í Frelsunarherinum deyður. Hann var í fleiri ár leiðari í „Fyrlyset", sum er ein miðstøð hjá Frelsunarherinum í Oslo, har tey, sum eru bundin av rúsevnum, kunnu koma. Her gjørdi Njál eitt sera gott og ótroyttandi arbeiði fyri tey heimleysu.

**Tekstur:** Frelsunarherurin



Njál Mackay Djurhuus varð „forfremmet til herligheten". 3. mai í ár. (Mynd: Ranveig Nordgaard)

Njál Mackay Djurhuus er „forfremmet til herligheten". 3. mai í ár sovnaði hann stillisliga í heiminum hjá Frelsunarherinum „Teisen Omsorg", har hann búði tað síðsta hálvt annað árið.

Njál Djurhuus varð føddur í Tórshavn 15. apr. 1941. Hann vaks upp í einum stórum barnaflokki hjá ommuni og abbanum. Mamma hansara búði eisini har. Hon var bert 16 ára gomul, tá hann varð føddur. Hann vaks upp uttan at vita, hvør pápi hansara var. Hetta merkti hann meira enn, hvat fleiri vistu um. Nógv ár seinni fekk familjan góða hjálp frá norsku sjónvaps-sendingini *Tore på sporet*. Pápin var tá deyður, men tey funnu, hvar hann var grivin. Tey funnu eisini fram til familjuna í Skotlandi. Eftir tað tók hann skotska navnið hjá pápanum, Mackay, sum millumnavn.

Njál og Erna funnu hvønn annan, meðan tey búðu í Havn. Bæði høvdu kall at verða offiserar í Frelsunarherinum. Fyrstu uppgávuna fingu tey í 1962 – at tey skuldu fara til Borkenes í Noregi. Síðan arbeiddu tey í Nannestad og Farsund í Noregi, í Reykjavík og á Akureyri í Íslandi, og síðan aftur í Noregi: í Torp, Molde, Fredrikstad, Bergen og Sarpsborg.

Erna og Njál fingu trý børn: Helenu, Eyðstein og Jan.

### Evnini at gera mun

Í árunum 1985-1999 vóru Njál og Erna leiðarar í „Fyrlyset" í Urtegata í Oslo, sum er ein miðstøð hjá Frelsunarherinum fyri tey, sum eru bundin av rúsevnum í Oslo. Við stórum kærleika hjálptu tey sínum medmenniskjum á so mangan hátt. Tey hjálptu menniskjum, sum høvdu samfelagsligar avbjóðingar og teimum heimleysu.

Njál hevði eitt lætt lyndi og gott sinnalag og dugdi væl at samskifta við øll menniskju, við sínum evnum at síggja hvønn einstakan og at finna møguleikar. Tað er ikki altíð so lætt at samskifta við tað almenna, men Njál dugdi at taka til viðgerðar truplar spurningar og at loysa teimum til góða, sum eru minni ment og eru nakað niðarlaga á sosiala tignarstiganum. Hann slepti teimum ikki, men arbeiddi við teimum sum sínum næsta. Arbeiðið gav úrslit og virðing. Aftanfyri alt arbeiðið lá ein djúp sannføring, at øll menniskju hava eins stórt virði. Í 1998 gav Lunde Forlag út bókina „Gatefolk og fyrlysmennesker" um Ernu og Njál. Bókin varð skrivað av Hilde Dagfinrud Valen. Í 2000 fingu tey bæði St. Hallvard-heiðursmerki, sum er hægsta heiðursmerki, sum verður latið frá Oslo býi. Í 2007 fingu tey bæði „Hans Majestet Kongens" heiðursmerki í gulli. Tað eru sera fá, sum fáa henda heiðurin.

Frá 1999 og til hann varð eftirløntur í 2009, arbeiddi Njál á høvuðsstøðini hjá Frelsunarherinum sum deildarleiðari fyri kunning og tíðindaflutning. Men samstundis arbeiddi hann eisini sum sjálvboðin á Fyrlyset. Tíðina sum eftirløntur brúkti hann m.a, at skriva bøkur á føroyskum um søguna hjá Frelsunarherinum í Føroyum. Eisini skrivaði hann um sítt egna lív og tænastu. Erna doyði í 2016. Nøkur ár seinni varð hann giftur aftur við majorinum Synnevu Vestheim. Sum soldátur í Frelsunarherinum arbeiddi Njál í Fjellhamar korpsinum, sum er uttan fyri Oslo.

### Sekkjapípa og sangurin hjá Njál

Jarðarferðin hjá Njál var friggjadagin 24. mai frá Vestre Gravlunds kapell. Við til jarðarferðina vóru heiðursvaktir. Oberstloytnanturin Elisabeth Henne skipaði fyri jarðarferðini. Familjurnar Joensen og Petersen úr Føroyum sungu ein sang, sum Njál hevði skrivað á føroyskum. Svein Roar Arnesen spældi og sang sangin *En tur rundt i byen* eftir Finn Kvalvik. Dóttirmaðurin Olav Johan Østbø helt eina minnistalu vegna familjuna og kommandørurin Knud David Welander takkaði vegna Frelsunarherin. Nikolai Hauge Huse spældi sangin „Amazing grace" á sekkjapípu, tá kistan varð borin út á gravstaðið. Hetta bleiv ein sterk og rørandi løta, ið staðfestu familjurøturnar, sum Njál fann aftur í Skotlandi. Tað eru mong sum við takksemi minnast Njál, tí hann hevur hjálpt so mongum, tá lívið var trupult. Frelsunarherurin takkar fyri langa og trúfasta tænastu, og lýsa frið yvir minnini eftir Njál Mackay Djurhuus. ■





Mynd: Mette Randem

# *Styrki og vón*

Frelsunarherurin er ein kristin kirkja, rørsla og felagsskapur, sum arbeiðir í meir enn 130 londum kring heimin, og hevur 4 eindir í Føroyum.

Gjøgnum fevnandi og innbjóðandi felagsskap geva vit møguleika til tænastu á sosiala økinum, tilknýti og trúgv. Hurðarnar eru opnar fyri øll – børn, vaksin, familjur og eldri.

Ein týðandi partur av arbeiðinum eru tænastur og tilboð til menniskju, sum liva í fátækradømi, einsemi ella eru bundin av rúsevnum, sita í fongsli, eru fyri umsorganarsviki ella offur fyri menniskjahandli og tey, sum eru sálarliga sjúk, avvarðandi, arbeiðsleys ella innflytarar.

Frelsunarherurin hevur verið við til at ment heimsmálini hjá ST.



Mynd: Finngerð Djurhuus Olsen

## Krigsropet

137. árgangur, serútgáva á føroyskum 2024
ISSN 0450-9366

Kommandør T.I. Øgrims plass 4
Postboks 6866 St. Olavs plass, 0130 Oslo
Telefon 0047 22 99 85 00
Bankgiro/gávukonta 3000 15 07350
T-postur: krigsropet@frelsesarmeen.no
frelsesarmeen.no/krigsropet

Ritstjórnin tekur ikki ábyrgd fyri tilfari sum verður sent óumbiðið.

**Blaðhald**
Árliga kr 950, hálvárliga kr 750, kvartal kr 650, árliga útland kr 1300

**Bílegging av haldi:**
krigsropet@frelsesarmeen.no
Ella tlf: 0047 22 99 85 00

**Útgevari**
Frelsunarherurin í Noregi

**Ábyrgdarritstjóri**
Hilde Dagfinrud Valen

**Ritstjórnarskrivari**
Randi Matland

**Sniðgevi**
Dana M. Strandli

**Ritstjórn**
Randi Bjelland, Marit Dehli-Johannesen, Stine Frimann, Emmaline Sophie Hekneby, Haakon Sand og Dan Christian Kristoffersen

**Forsíða**
Ólavur Frederiksen

**Baksíða**
Mette Randem

**Stovnari**
William Booth, generalur

**Heimsleiðari**
Lyndon Buckingham, generalur

**Leiðari fyri Frelsunarherin í Noregi, Íslandi og Føroyum**
Kommandørur Knud David Welander

**Prent** Føroyaprent

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705



# Vælkomin við í Frelsunarherin

**Vikuskrá fyri Frelsunarherin í Vági**

| | |
|---|---|
| Mánadag | kl 10.30 Bíbliu- og bønarmøti |
| Týsdag | kl 09.30 „Orðið á borðið“ |
| | kl 15.30 Andaktir á ellisheimum |
| | kl 17.00 „JuniorKlubbi“ |
| Mikudag (líka vika) | kl 20.00 Heimaforbundið |
| Sunnudag | kl 12.00 Sunnudagsskúli |
| | kl 18.00 Møti |





**Vikuskrá fyri Frelsunarherin í Tórshavn**

| | |
|---|---|
| Mánadag | kl 15.00 Bønarmøti |
| Týsdag | kl 19.00 Hornvenjing |
| Mikudag | Andaktir á ellisheimum |
| Hósdag (líka viku) | Heimaforbundið |
| Hósdag (ólíka viku) | Ungdómskvøld |
| Sunnudag | kl 11.00 Møti og sunnudagsskúli |
| | kl 18.00 Kvøldsmøti |